LM-088/2023

# Løgmálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 07.03.2024 |
| Mál nr.: | 23/09500-87 |
| Málsviðgjørt: | EM/NF |
| Ummælistíð: | 08.01.2024 – 05.02.2024 |
| Eftirkannað: | 15.02.2024 |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um fosturtøku (Fosturtøkulógin)

*Fosturtøka, sum ikki krevur loyvi*

**§ 1.** Kvinna, sum býr í Føroyum og er við barn, kann fáa fosturtøku, um inntrivið kann verða gjørt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini, og kvinnan hevur fingið í boði ráðgeving sambært § 7 og læknafrøðiliga kunning og vegleiðing um inntrivið sambært § 10.

**§ 2.** Hóast freistin sambært § 1 er farin, kann ein kvinna fáa fosturtøku eftir 12. viku í viðgongutíðini uttan loyvi, um lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda, ella um inntrivið er neyðugt fyri at forða fyri, at likamliga og sálarliga heilsan viknar munandi, og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður.

*Loyvi at fáa fosturtøku eftir 12. viku*

**§ 3.** Kvinna, sum býr í Føroyum, kann fáa loyvi til at fáa fosturtøku eftir 12. viku, um:

1) viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum hevur við sær vanda fyri, at heilsan hjá kvinnuni viknar orsakað av verandi sjúku ella hóttandi likamligari ella sálarligari sjúku ella ómegdarstøðu, ella av lívsviðurskiftum hennara aðramáta,
2) kvinnan er vorðin við barn undir umstøðum, sum nevndar eru í § 210 ella §§ 216-224 í revsilógini,
3) vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku,
4) kvinnan orsakað av likamligari ella sálarligari sjúku ella sálarligum menningartarni ikki megnar at hava umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt, ella
5) viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum má metast at vera ein so álvarslig byrða fyri kvinnuna, sum ikki kann sleppast undan á annan hátt enn við fosturtøku,

og at tað fyri kvinnuna, fyri at halda uppi húsi og heimi hennara ella av umsorgan fyri øðrum børnum í familjuni má metast at vera neyðugt, at viðgongutíðin verður avbrotin.

**§ 4.** Loyvi til fosturtøku eftir 12. viku kann bara verða givið, um tey viðurskifti, sum grunda eina umsókn um fosturtøku, standa mát við heilsuliga vandan, sum inntrivið hevur við sær.

**§ 5.** Er fostrið lívført, kann loyvi til fosturtøku bara verða givið, um umstøðurnar nevndar í § 3,
nr. 3 avgerandi tala fyri tí.

*Felagsreglur*

**§ 6.** Fosturtøka kann bara verða framd av lækna í sjúkrahúsverkinum.

**§ 7.** Kvinnan skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Ráðgevingin skal m.a. fevna um møguleikarnar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina og fyri stuðli eftir, at barnið er føtt.
*Stk. 2.* Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um ráðgevingina.

*Umsókn um fosturtøku*

**§ 8.** Kvinnan skal sjálv søkja um at fáa fosturtøku. Umsókn um fosturtøku verður latin einum kommunulækna.
*Stk. 2.* Er kvinnan orsakað av sinnissjúku, viknaðum sinnisligum virkisføri ella álvarsliga viknaðari heilsu ella líknandi ikki før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann samráðið sambært § 14 loyva fosturtøku eftir umsókn frá einum serligum verja, tá ið umstøðurnar tala fyri tí. Fyri tilnevnan av verja er § 50 í anordning om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven galdandi.

*Kvinna undir 18 ár*

**§ 9.** Er kvinnan undir 18 ár, og er hon ikki gift, skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, geva samtykki til at søkja um fosturtøku.
*Stk. 2.* Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann samráðið loyva, at samtykki sambært stk. 1 ikki skal innheintast.
*Stk. 3.* Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku, sjálvt um samtykki sambært stk. 1 verður noktað.

*Vegleiðing og kunning frá læknanum o.a.*

**§ 10.** Læknin, sum fær umsókn um fosturtøku, skal upplýsa kvinnuna um møguleikan fyri ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 7.
*Stk. 2.* Læknin skal vegleiða og kunna kvinnuna um inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið. Tað sama er galdandi fyri tann, sum søkir sambært § 8, stk. 2, ella samtykkir sambært § 9, stk. 1.
*Stk. 3.* Læknin kann hjálpa kvinnu undir 18 ár at senda samráðnum umsókn um loyvi sambært § 9, stk. 2 og 3.

**§ 11.** Metir læknin, at treytirnar fyri fosturtøku í §§ 1 og 2 ikki eru loknar, skal læknin beinanvegin leggja umsóknina saman við sínum úttalilsi fyri samráðið.

**§ 12.** Er umsóknin um fosturtøku grundað á umstøður, sum nevndar eru í § 3, nr. 3, skal læknin kunna kvinnuna um møguleikarnar fyri at fáa meira kunning og ráðgeving hjá viðkomandi myndugleikum, felagsskapum og serlæknum.

**§ 13.** Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um umsókn um fosturtøku og um viðgerð av málum um fosturtøku.

*Samráð*

**§ 14.** Landsstýrisfólkið setir eitt samráð, sum skjótast gjørligt tekur avgerð í málum sambært §§ 3-5, § 8, stk. 2, og § 9, stk. 2 og 3.

*Stk. 2.* Í samráðnum eru ein løgfrøðingur, ein sosialráðgevi, ein sálarfrøðingur og tveir læknar. Annar læknin skal vera serlækni í kvinnusjúkum, og hin læknin skal vera serlækni í psykiatri.
*Stk. 3.* Limirnir í samráðnum og teirra varalimir sita 4 ár í senn.
*Stk. 4.* Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið.

**§ 15.** Avgerðir í samráðnum verða tiknar við vanligum meiriluta.

*Kæra*

**§ 16.** Avger samráðið, at treytirnar fyri fosturtøku í §§ 3-5, § 8, stk. 2 og § 9, stk. 2 og 3 ikki eru loknar, sendir samráðið beinanvegin avgerðina til Føroya Kærustovn saman við grundgeving fyri avgerðini, um kvinnan, verjin ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan ynskja tað.
*Stk. 2.* Serkøn hjá Føroya Kærustovni í hesum málum eru ein serlækni í kvinnusjúkum ella ein barnalækni og ein serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin.
*Stk. 3.* Kærustovnurin skal taka avgerð skjótast tilber og í seinasta lagi innan 7 dagar.
*Stk. 4.* Burtursæð frá stk. 1 og 2 er løgtingslóg um Føroya Kærustovn galdandi fyri málgongdina í Føroya Kærustovni.

*Ársfrágreiðing*

**§ 17.** Samráðið sendir landsstýrisfólkinum ársfrágreiðing um virksemi sítt.

*Revsiásetingar*

**§ 18.** Er ikki harðari revsing ásett eftir revsilógini verður lækni, sum fremur fosturtøku, uttan at treytirnar í §§ 1 og 2 eru loknar, og uttan at tað er givið loyvi eftir §§ 3-5, revsaður við sekt ella fongsli í upp í 2 ár.
*Stk. 2.* Er ikki harðari revsing ásett eftir revsilógini verður lækni, sum fremur fosturtøku uttan at treytirnar í §§ 8 og 9 og § 10, stk. 2 eru loknar, revsaður við sekt.
*Stk. 3.* Er ikki harðari revsing ásett eftir revsilógini verður tann, sum ikki er lækni, og sum fremur fosturtøku, revsaður við fongsli í upp í 4 ár.
*Stk. 4.* Stk. 1 og 3 verða brúkt á sama hátt fyri tann, sum hjálpir til við slíkum virksemi.

**§ 19.** Lógarbrot, sum eru framd av ósketni, verða ikki revsaði.

*Gildiskoma og úrgildisseting*

**§ 20.** Hendan løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2024, og samstundis fer úr gildi lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v.

# Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

## 1.1. Orsakir til uppskotið
Landsstýrismaðurin í lógarmálum hevur avgjørt at endurskoða fosturtøkulógina.

Galdandi lóg um fosturtøku er frá 1956 og er í nógvar mátar ótíðarhóskandi. Seinastu árini hevur nógv kjak staðist av lógini, og tíðin er nú komin til at endurskoða lógina og gera hana meira tíðarhóskandi.

## 1.2. Galdandi lóggáva
Í sambandi við arbeiðið at endurskoða galdandi fosturtøkulóg, fór Løgmálaráðið undir at lýsa málið nærri og hevur í hesum sambandi havt eina røð av fundum við áhugabólkar, felagsskapir og onnur, ið kunnu metast at hava týðandi vitan ella áhuga í arbeiðinum.

Endamálið við fundunum hevur m.a. verið at lýsa fyrimunir og vansar við galdandi lóg, eins og endamálið hevur verið at lýsa, hvørt lógin virkar eftir ætlan.

Reglur um fosturtøku eru ásettar í lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021.

Sambært lógini kann fosturtøka loyvast í fýra førum:

1. Um lív og heilsa kvinnunnar er í vanda.
2. Um kvinnan er vorðin við barn við neyðtøku ella blóðskemd. Tá skal málið meldast til løgregluna, og eftir at málið er kannað, skal tað ikki verða avvíst sum ósatt.
3. Um fostrið er í vanda fyri at fáa álvarslig likamlig ella sálarliga brek. Epilepsi verður góðtikið sum ein grund fyri at fáa fosturtøku.
4. Um mett verður, at kvinnan ikki er før fyri at taka sær av barninum orsakað av likamligum ella sálarligum brekum, ella av aðrari læknaligari orsøk.

Sosial atlit, so sum aldur, inntøka, arbeiðsstøða, familjuviðurskifti og tílíkt verða ikki nevnd í hesum sambandi.

Avgerðin um at fremja fosturtøku skal takast í samráði millum tveir løggildar læknar, og tað eru læknarnir, sum meta um, hvørt omanfyri nevndu treytir eru loknar. Er lív og heilsa kvinnunnar í vanda, kann avgerð um fosturtøku takast av yvirlæknanum á sjúkrahúsinum.

Sambært lógini kann fosturtøka í teimum í nr. 2-4 nevndu førum vanliga ikki verða framd eftir 16. viku. Dømi um fosturtøkur, ið kunnu fremjast eftir viku 16 er eitt nú staðfesting av, at barnið ber deyðiligt brek og ikki kann liva uttanfyri móðurlívið. Eingin freist er ásett í lógini, um lív og heilsa kvinnunnar er í vanda.

Tað er eingin læknafaklig grund til, at markið er sett til júst 16. viku, eins og tað eingin endalig niðurstøða er um, nær lívið byrjar.

Hóast lógarásetta markið er 16 vikur, verða fosturtøkur vanliga ikki framdar eftir 12. viku í viðgongutiðini. Fosturtøkur verða vanliga framdar sum medisinskar fosturtøkur fram til viku 8-9. Eftir hetta verður fosturtøkan vanliga framd kirurgiskt.

Soleiðis sum lógin nú er orðað, kann ivi verða sáddur um mannagongdirnar fyri at fáa fosturtøku. Tveir løggildir læknar skulu meta um, hvørt treytirnar fyri at fáa fosturtøku eru loknar. Tað kann vera ymiskt, hvussu lógin verður umsitin, soleiðis at tað er munandi lættari at fáa atgongd til fosturtøku hjá summum læknum enn øðrum. Mett verður tí, at lógin er ov ógreið og skapar ótryggleika, óvissu og ójavna. Vandi er tí fyri, at allar kvinnur ikki eru eins fyri lógini.

Ivi kann eisini verða sáddur um, um tað er rætt at lata læknar taka avgerð um, hvørt ein kvinna skal hava loyvi til fosturtøku ella ikki. Talan er um eina somikið inntrívandi avgerð, sum hevur stórar avleiðingar fyri lívið hjá einari kvinnu. Læknar eru ikki lógarkønir, og tað fer út um teirra fakkunnleika at meta um og tulka lógir, eins og tað ikki er ein læknalig uppgáva at taka eina fyri kvinnuna so eyma og persónliga avgerð, sum í roynd og veru ikki viðkemur teimum.

Galdandi lóg er ein forboðslóg við strongum undantøkum, og lógin heimilar, at kvinnan kann verða dømd fongsulsrevsing fyri at hava fingið framt fosturtøku, eins og pápin at barninum kann verða revsaður, um hann eftir umbøn ikki vil veita kvinnuni fíggjarligan ella persónligan stuðul, og tað verður prógvað, at hetta hevur viðvirkað til, at kvinnan hevur fingið framt fosturtøku. Somuleiðis kunnu læknar, sum fremja fosturtøku, verða dømdir fongsulsrevsing, um lógarásettu treytirnar fyri at fáa fosturtøku ikki eru loknar.

Hóast lógin í fleiri førum heimilar revsing, veit Løgmálaráðið ikki um nøkur dømir um, at hesar heimildir eru brúktar.

Hóast fosturtøka sambært lógini bara kann verða framd, um ávísar treytir eru loknar, er tað nógv sum bendir á, at lógin ikki avmyndar galdandi siðvenju á økinum, og at kvinnur, sum ynskja fosturtøku áðrenn endan av 12. viku, hava lutfalsliga lætta atgongd til at fáa fosturtøku. Tað veldst tó um, hvønn lækna, kvinnan vendir sær til. Um kvinnan vendir sær til ein lækna, sum ikki gevur loyvi til fosturtøku, kann kvinnan venda sær til ein ella fleiri aðrar læknar og har fáa játtandi svar. Hendan mannagongdin verður ofta samanborin við at fara á eina biddaraferð, sum er óvirðilig fyri kvinnuna og setir hana í eina enn trengri støðu.

Um ein kvinna fær loyvi til at fáa fosturtøku, verður tað ikki nágreinað nærri í sjúklingajournalini, hvør orsøkin til fosturtøkuna er. Tað verður bara skrivað, at kvinnan lýkur treytirnar fyri at fáa fosturtøku.

Dømir eru eisini um sonevnda fosturtøku ferðavinnu, har føroyskar kvinnur, sum ikki lúka galdandi treytir fyri at fáa fosturtøku í Føroyum, leita sær til Danmarkar og møguliga eisini onnur lond at fáa fosturtøku. Hesar kvinnur skulu rinda alt sjálvar, tað er flogferðaseðil, uppihald og tær umleið 10.000-13.000 krónurnar, sum tað kostar at fáa fosturtøku á einum privatum sjúkrahúsi í Danmark. Tað eru upphæddir, sum raka tær fátækastu kvinnurnar ógvuliga hart, og hetta er við til at skapa ein sosialan ójavna.

Tað eru eingi neyv tøl um, hvussu nógvar føroyskar kvinnur, búsitandi í Føroyum, leita sær uttanlands fyri at fáa fosturtøku.

Ein avleiðing av, at talan er um eina forboðslóg við strongum undantøkum er, at t.d. fíggjarliga sperdar kvinnur, sum ikki hava ráð og umstøður at fara uttanlands at fáa fosturtøku, taka aðrar og ótryggar mannagongdir í brúk fyri at fáa fosturtøku.

Dømir eru um, at føroyskar kvinnur, sum ikki lúka galdandi treytir fyri at fáa fosturtøku í Føroyum, sjálvar og ólógliga innflyta fosturtøkuheilivág, sum kann keypast á alnetinum. Tað kann hava álvarsligar fylgjur at taka slíkan heilivág uttan vegleiðing frá lækna og kann í ringasta føri bæði vera lívshættisligt og ganga út yvir eginleikarnar hjá hesum kvinnum til seinni í lívinum at fáa børn.

Um kvinnan er gift, skal hjúnafelagin hava høvi at úttala seg, áðrenn fosturtøka verður framd, uttan so at serlig viðurskifti tala ímóti hesum. Er kvinnan ógift og undir 18 ár, skal tann, ið hevur foreldramyndugleikan, geva samtykki, uttan so at týðandi viðurskifti tala ímóti hesum. Serligar treytir verða ikki settar ógiftum kvinnum omanfyri 18 ára aldur.

Er kvinnan orsakað av sinnissjúku, viknaðum sinnisligum virkisføri ella viknaðari heilsu ella líknandi ikki før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann ein verji seta fram umbøn um fosturtøku. Vikið kann verða frá hesum treytum, um vandi er fyri lívi og heilsu hjá kvinnuni vegna sjúku.

Í galdandi lóg verður mødrehjælpsinstitutión nevnd, men ein slíkur stovnur er ongantíð settur á stovn í Føroyum. Ætlanin var, at mødrehjælpsinstitutionen skuldi vera tann fyrsti stovnurin, sum kvinnan vendi sær til, tá ið hon ynskti fosturtøku. Stovnurin skuldi síðani kanna, um treytirnar fyri fosturtøku vóru loknar, og avgerð um at fremja fosturtøku skuldi takast av einum samráði, har leiðarin fyri mødrehjælpsinstitutionen og tveir læknar skuldu vera limir. Í lógini er ásett, at til ein mødrehjælpsinstitution verður stovnað í Føroyum, verður fosturtøka loyvd í samráð millum tveir løggildar læknar.

Í dag bjóðar Gigni navnloynt prát við ein heilsufrøðing, sum er fosturtøkuráðgevi. Eisini ber til at fáa ókeypis ráðgeving frá sálarfrøðingi, løgfrøðingi, sosialráðgeva ella øðrum viðkomandi fakkunnleika.

Fosturtøkuráðgevingin hjá Gigni hevur verið lítið brúkt. Í 2022 vóru 6 samrøður og í 2021 vóru 5 samrøður.

Mammuhjálpin hjá Pro Vita bjóðar somuleiðis ráðgeving í sambandi við fosturtøku.

Hvørki fosturtøkuráðgevingin hjá Gigni ella Mammuhjápin eru nevndar í galdandi lóg.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at dagføra galdandi lóg um fosturtøku, soleiðis at hon verður meira nútíðarhóskandi og avmyndar verandi siðvenju á økinum. Somuleiðis verður lógin samstundis lagað til føroysk viðurskifti.

Endamálið við uppskotinum er at tryggja, at allar kvinnur eru eins fyri lógini. Galdandi lóg er ógreið og verður tulkað somikið ymiskt, at hon skapar ótryggleika, óvissu og ójavna.

Endamálið við uppskotinum er harafturat at hava fosturtøkutalið so lágt sum gjørligt. Dentur verður tí lagdur á at betra um møguleikarnar hjá kvinnum, sum umhugsa fosturtøku, at fáa viðkomandi ráðgeving frá fakfólki, eins og dentur verður lagdur á upplýsing og fyribyrging.

Eitt annað endamál er at tryggja, at fosturtøka fer fram undir skipaðum og tryggum umstøðum í sjúkrahúsverkinum.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

### *1.4.1. Atgongd til fosturtøku*

Fosturtøkur hava verið og fara at verða framdar, eisini um fosturtøka er bannað við lóg ella bara loyvd undir nærri ásettum treytum. Er fosturtøka bannað við lóg, ella bara loyvd undir ávísum umstøðum, finna kvinnur aðrar loysnir. At nokta kvinnum fosturtøku hevur sostatt ikki við sær, at fosturtøkur ikki verða framdar. Hinvegin hevur tað fleiri vansar við sær. Kvinnur fáa ólógligar fosturtøkur ella leita sær til onnur lond, har tað er loyvt. Ólógligar fosturtøkur kunnu vera lívshættisligar og ótryggar, og at fara uttanlands at fáa fosturtøku er bæði kostnaðarmikið, seinkar tilgongdina og økir um sosialan ójavna.

Tí er neyðugt við eini føroyskari fosturtøkulóg, sum tryggjar føroyskum kvinnum rætt og javnbjóðis atgongd til trygga fosturtøku.

Tað kunnu verða nógvar og ymiskar orsakir til, at ein kvinna umhugsar fosturtøku. Allar kvinnur kunnu koma í so truplar lívsstøður, at fosturtøka fyri tær er frægasti útvegur.

Tá tað ræður um spurningin um fosturtøku eru fleiri atlit, sum skulu takast. Tað er atlitið at kvinnuni og hennara rætti til sjálv at taka avgerðir um og ráða yvir egnum kroppi, atlitið at fostrinum, atlitið at manninum og atlitið at heilsustarvsfólkum, sum skulu fremja fosturtøkuna.

Tað er torført at taka atlit at øllum pørtum í einum lógaruppskoti um fosturtøku.

Rætturin hjá kvinnum til sjálvar at taka avgerð um sín egna kropp og reproduktivu heilsu vigar tungt í hesum sambandi. Tað er helst eingin ivi um, at kvinnan í allar flestu førum sjálv kennir sína støðu best og sostatt er tann, sum er best før fyri at taka avgerðina um, hvørt hon skal hava fosturtøku ella ikki.

Mett verður tí, at stórur tørvur er á at geva kvinnum rætt til, innan eina nærri ásetta freist, til sjálvar at avgera, hvørt tær vilja hava fosturtøku ella ikki.

Við at staðfesta, at kvinnan sjálv kann taka avgerð um fosturtøku innan eina ávísa freist, verða allar kvinnur eins fyri lógini, tó so at kvinnur undir 18 ár sum meginregla skulu hava samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan.

Mett verður, at uppskotið er við til at forða fyri, at kvinnur koma illa fyri av ólógligum og ótryggum fosturtøkum uttan vegleiðing frá lækna. Sosiali ójavnin minkar, av tí at kvinnur ikki noyðast at fara uttanlands fyri at fáa fosturtøku, og tær sleppa undan at fara eina eyðmýkjandi gongd frá lækna til lækna fyri at fáa loyvi til fosturtøku. Hetta er eisini í ávísan mun við til at avmynda verandi siðvenju á økinum.

Um ein kvinna ikki sjálv er før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann ein verji søkja um fosturtøku vegna kvinnuna. Hetta er eisini galdandi í dag.

Sambært galdandi lóg skal hjúnafelagi hava høvi til at úttala seg, áðrenn ein kvinna fær fosturtøku.

Tað kann vera við til at tryggja sjónarmiðini hjá manninum og pápanum at barninum, um hann hevur rætt til at vera hoyrdur ella til at úttala seg, áðrenn ein møgulig fosturtøka verður framd. Tó er hetta í andsøgn við rættin hjá kvinnuni til sjálv at taka avgerðina og tað, sum er ført fram omanfyri. Somuleiðis kann talan vera um støður, har umstøðurnar avgerandi tala ímóti, at tað skal vera eitt krav, at maðurin ella pápin at barninum skal úttala seg. Tað er eisini trupult at áseta møguligar avleiðingar av ikki at handhevja eitt slíkt krav, um maðurin ella pápin at barninum ikki verður hoyrdur.

Er talan um hjún ella eitt samlivandi par, er tað natúrligt at geva manninum høvi til at úttala seg. Mett verður tó ikki, at tað skal vera eitt lógarfest krav fyri at fáa fosturtøku, at hann skal hoyrast og úttala seg, áðrenn ein møgulig fosturtøka verður framd.

### *1.4.2. Fosturtøkumarkið*

Sambært galdandi lóg er markið fyri, nær ein fosturtøka undir nærri ásettum treytum kann verða framd, sett til 16 vikur.

Eingin endalig niðurstøða er um, nær lívið byrjar. Fosturtøkur eiga at verða framdar so tíðliga sum gjørligt. Samstundis eigur at verða tryggjað, at kvinnan hevur góðar møguleikar fyri at taka eina vælgrundaða avgerð. Hetta er við til at tryggja eina javnvág millum atlitið at ávikavist fostrinum og kvinnuni.

Hóast fosturtøkumarkið sambært galdandi lóg er 16 vikur, verða fosturtøkur vanliga ikki framdar eftir 12. viku. Tær flestu fosturtøkurnar, sum verða framdar í Føroyum, verða framdar sum medisinskar fosturtøkur. Tær verða vanliga framdar fram til 8.-9. viku. Eftir hetta verður fosturtøka vanliga framd sum kirurgisk fosturtøka. Talan er tá um eitt inntriv, og vandin fyri komplikatiónum verður størri.

Við at seta markið so tíðliga sum gjørligt, verður atlit eisini tikið at læknum og heilsustarvsfólki, sum eru við til at fremja eina fosturtøku. Fyri læknar og heilsustarvsfólk kann tað vera ein byrða at skula fremja sonevndar seinfosturtøkur.

Mett verður, at markið tí hóskandi kann verða sett til endan á 12. viku í viðgongutíðini, tað vil siga, tá kvinnan er komin 11 vikur og 6 dagar ella til og við viku 11+6.

Skotið verður upp, at einki loyvi krevst fyri at fáa fosturtøku, um inntrivið kann verða framt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini, uttan so at kvinnan ikki er før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, ella um kvinnan er undir 18 ár.

### *1.4.3. Samráð*

Tað kunnu verða støður, har tørvur er á fosturtøku eftir 12. viku, eitt nú um vandi er fyri, at heilsan hjá kvinnuni viknar, um staðfest verður, at fostrið er álvarsliga sjúkt, undir hesum um fostrið hevur álvarslig avskap, um kvinnan er vorðin við barn orsakað av neyðtøku ella blóðskemd, ella um kvinnan ikki er før fyri at taka sær av barninum.

Skotið verður tí upp, at fosturtøka í ávísum førum kann verða framd eftir 12. viku. Hetta krevur tó serstakt loyvi.

Eitt av aðalmálunum við uppskotinum er, at eingin kvinna skal fáa fosturtøku orsakað av fíggjarligum ella sosialum umstøðum. Tó verður mett, at tørvur er á eini áseting, sum heimilar, at fosturtøka við loyvi frá samráðnum kann verða framd eftir 12. viku orsakað av sosialum umstøðum.

Skotið verður upp, at landsstýrisfólkið setir eitt samráð, sum tekur avgerð um, hvørt ein kvinna kann fáa fosturtøku eftir 12. viku. Samráðið verður mannað við fakfólki við læknafakligari, løgfrøðiligari, sosialfakligari og sálarfrøðiligari vitan á økinum, so tryggjað verður, at mett er um øll viðkomandi viðurskifti, áðrenn loyvi verður givið til fosturtøku.

Fyri at tryggja, at samráðið er politiskt óheft, verður samráðið sett eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleikum og fakfeløgum.

Við at seta eitt samráð verður tað eitt og sama ráð, sum fer at meta um, hvørt treytirnar fyri at fáa fosturtøku eru loknar, og um loyvi kann verða givið til fosturtøku ella ikki. Harvið verður siðvenja á økinum eisini eins, og hetta er við til at tryggja, at allar kvinnur eru eins fyri lógini. Eisini verða opinleiki og gjøgnumskygni tryggjað í mun til tær avgerðir, sum verða tiknar av samráðnum.

Líknandi skipan er í Danmark, har seinastu tølini fyri 2023 fram til september vísa, at 631 kvinnur hava søkt um fosturtøku eftir markið á 12 vikur, og 52 teirra hava fingið noktað loyvi til fosturtøku.

Jú longri í viðgongutíðini kvinnan er komin, jú størri er vandin fyri komplikatiónum í sambandi við fosturtøku. Heilsuvandin kann skifta alt eftir fleiri viðurskiftum, undir hesum heilsustøðuni hjá kvinnuni, hvussu fosturtøkan verður framd og møguligum komplikatiónum undir inntrivinum.

Loyvi til fosturtøku kann tí bara verða givið, um tey viðurskifti, sum grunda eina umsókn um fosturtøku, standa mát við heilsuliga vandan, sum eitt inntriv eftir 12. viku í viðgongutíðini hevur við sær.

Loyvi kann sum meginregla ikki gevast til fosturtøku, um fostrið er lívført. Sostatt verður eitt evsta mark sett fyri, nær fosturtøka kann verða framd.

Er fostrið lívført, kann loyvi til fosturtøku bara verða givið, um fostrið er so álvarsliga sjúkt, at avgerandi grundir tala fyri ikki at noyða kvinnuna at ganga viðgongutíðina út. Í metingini av lívførinum hjá einstaka fostrinum er tað avgerandi, um verulig útlit eru til, at barnið kann yvirliva í øllum førum í nakrar vikur, um tað varð føtt, tá ið inntrivið annars var ætlað. Um so er, verður mett, at fostrið er lívført.

Løgfrøðiliga verður eitt fostur mett sum eitt barn, um í minsta lagi 22 fullar vikur av viðgongutíðini eru farnar, tað vil siga tá ið kvinnan er komin 22 + 0 í viðgongutíðini. Um barnið tá verður føtt og ikki vísir lívstekin, er talan um eitt deyðføtt barn og ikki eina fosturtøku. Hetta merkir, at tað sambært § 189, stk. 1 í anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021 (sundheitslógini) skal fremjast líksýn, og deyðsváttan skal útflýggjast.

Avger samráðið, at loyvi ikki kann verða givið til fosturtøku, skal samráðið beinanvegin leggja málið fyri Føroya Kærustovn til støðutakan, um kvinnan framvegis vil hava fosturtøku. Serkøn hjá Føroya Kærustovni í hesum málum eru ein serlækni í kvinnusjúkum ella ein barnalækni og ein serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin.

Samráðið skal á hvørjum ári gera eina ársfrágreiðing, sum verður latin landsstýrisfólkinum.

### *1.4.4. Aldursmarkið*

Sambært galdandi lóg skal tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, geva samtykki til fosturtøku, um kvinnan er ógift og undir 18 ár, uttan so at týðandi atlit tala ímóti hesum.

Børn og ung undir 18 ár eru ómyndug og undir foreldramyndugleika, uttan so at tey eru gift. Tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, hava skyldu til at veita barninum umsorgan og hava ábyrgd av tryggleika barnsins.

Tað er ein stór og trupul avgerð at taka, hvørt ein fosturtøka skal fremjast ella ikki. Talan er um eina so týðandi avgerð, sum kann fáa avleiðingar seinni í lívinum. Eitt krav um, at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleika skulu geva samtykki til eina fosturtøku, er við til at skapa eina stuðlandi og vegleiðandi rammu um gentuna ella ta ungu kvinnuna og møguliga lætta um avgerðartilgongdina. Hetta er eisini við til at tryggja og verja vælveruna hjá gentuni ella tí ungu kvinnuni.

Tí verður hildið fast um meginregluna um, at tann ella tey, ið hava foreldramyndugleikan, skulu geva samtykki til eina fosturtøku, um gentan ella kvinnan er undir 18 ár.

Tað kunnu tó vera støður, har umstøðurnar avgerandi tala ímóti at krevja samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, t.d. um gentan ella unga kvinnan er vorðin við barn við blóðskemd, ella um orsøk er til at halda, at tað fer at fáa álvarsligar fylgjur fyri gentuna ella ungu kvinnuna, um tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, fáa kunnleika um, at hon er við barn.

Tí verður mett, at tað er neyðugt við einum undantaki til kravið um samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, um gentan er undir 18 ár.

Umframt at taka avgerð um, hvørt fosturtøka kann verða loyvd eftir 12. viku, skal samráðið eisini taka avgerð um, hvørt ein genta undir 18 ár kann fáa loyvi til fosturtøku uttan samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan.

### *1.4.5. Mannagongd*

Fyri at fáa fosturtøku, skal kvinnan sjálv søkja um tað við at venda sær til sín kommunulækna, sum kann ávísa hana til ein serlækna í kvinnusjúkum í sjúkrahúsverkinum.

Kvinnan kann eisini venda sær til ein annan kommunulækna, um so er, at tað eru umstøður sum gera, at hon ikki vil venda sær til sín egna lækna.

Læknin hevur skyldu til at vegleiða kvinnuna um inntrivið og um møguligar fylgjur og vandan, sum er sambundin við inntrivið. Læknin hevur somuleiðis skyldu til at vegleiða

kvinnuna um fyriliggjandi møguleikarnar fyri at fáa óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Kvinnan hevur tá eisini møguleika til at spyrja, um eitthvørt er, sum hon ivast í.

Vegleiðingarskyldan er somuleiðis galdandi, um ein verji søkir um fosturtøku vegna kvinnuna, og um kvinnan er undir 18 ár, og fosturtøka krevur samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan.

Vil kvinnan framvegis hava fosturtøku, skal hon útfylla eina umsókn um fosturtøku og samstundis vátta, at hon hevur fingið omanfyri nevndu kunning og vegleiðing. Tað er ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan skal hava fingið ráðgeving og stuðulssamrøður, men læknin hevur skyldu til at kunna kvinnuna um møguleikan at fáa óhefta ráðgeving og stuðulssamrøður sambært § 7.

Læknin kannar, hvussu langt í viðgongutíðini kvinnan er komin. Er kvinnan komin styttri enn 12. viku í viðgongutíðini, sendir læknin eina ávísing til serlækna í kvinnusjúkum, har fosturtøkan kann verða framd. Kvinnan fær tá eina innkalling frá sjúkrahúsinum. Tryggjast skal tá, at inntrivið kann verða framt innan freistina upp á 12 vikur.

Er kvinnan komin longri enn 12 vikur í viðgongutíðini, kann fosturtøka bara verða framd undir nærri ásettum treytum og við loyvi frá samráðnum, sum landsstýrisfólkið setir. Tá skal læknin beinanvegin leggja umsóknina saman við einum úttalilsi og skjalprógvi fyri kanningum, sum eru gjørdar í viðgongutíðini, fyri samráðið, sum síðani tekur avgerð í málinum.

Er umsóknin um fosturtøku grundað á, at barnið er álvarsliga sjúkt ella vandi er fyri, at barnið fær álvarsliga sjúku, undir hesum álvarslig avskap, skal læknin kunna kvinnuna um møguleikan fyri at fáa meira kunning og ráðgeving frá serlæknum og hjá viðkomandi myndugleikum og felagsskapum, so sum hjá MEGD, einum brekumboði, Almannaverkinum o.ø.

### *1.4.6. Ráðgeving*

Tað er eingin ivi um, at tað er ein trupul støða at standa í og ein trupul avgerð at taka, hvørt ein fosturtøka skal fremjast ella ikki. Tað kunnu vera nógvar og ymiskar orsakir til, at ein kvinna umhugsar fosturtøku.

Ein kvinna, sum umhugsar fosturtøka, skal ikki standa einsamøll í støðuni. Tað er tí umráðandi, at eitt lætt atkomuligt og alment tilboð er til kvinnur, sum umhugsa fosturtøku, har tær kunnu fáa góða ráðgeving og vegleiðing frá fakfólki, soleiðis at tær kunnu taka eina væl grundaða avgerð um teirra støðu á væl upplýstum grundarlagi.

Tað verður ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, hvørki áðrenn ella eftir 12. viku, at kvinna hevur fingið ráðgeving. Læknin, sum kvinnan vendir sær til, hevur tó skyldu til at tryggja sær, at kvinnan hevur fingið kunning og vegleiðing um sjálvt inntrivið, eins og læknin hevur skyldu til at upplýsa kvinnuna um, at hon kann fáa ráðgeving, um hon metir seg hava tørv á tí. Heldur enn at seta krav um, at kvinnan skal fáa ráðgeving, verður hetta eitt tilboð, sum kvinnan kann taka av, um hon sjálv ynskir tað.

Ætlanin er at skipa eitt tilboð, har kvinnur, sum umhugsa fosturtøku, kunnu venda sær fyri at fáa ráðgeving, vegleiðing og kunning frá fakfólki, um tær meta at tørvur er á tí. Ætlanin er, at tilboðið er tøkt bæði áðrenn og eftir, at ein møgulig fosturtøka verður framd.

Endamálið við einum slíkum tilboði er at geva kvinnuni kunning og stuðul til sjálv at kunna taka eina væl grundaða avgerð um, hvørt fosturtøka skal fremjast ella ikki. Endamálið er eisini at kunna kvinnuna um møguleikar fyri at fáa hjálp og stuðul, so sum fíggjarligan, sosialan og sálarfrøðiligan stuðul, um hon velur at eiga barnið.

Um ein kvinna fær fosturtøku, er endamálið við tilboðnum at stuðla henni í at koma í gjøgnum møguligan sálarligan og annan ampa av at hava fingið framt fosturtøku. Fyribyrging kann tá eisini verða ein partur av hesum.

Ætlanin er, at innihaldið í ráðgevingini verður skipað nærri í kunngerð ella leiðbeining, soleiðis at fakfólkini, sum skulu veita ráðgevingina vita, hvat hon skal innihalda, og soleiðis at tryggjað verður, at allar kvinnur hava í boði at fáa nøktandi og eins ráðgeving og vegleiðing.

Ætlanin er, at ráðgevingin skal fara at virka soleiðis, at ein telefon svarar ávísar tíðir, har kvinnan kann fáa eitt óheft og navnloynt prát við ein heilsufrøðing, sum er fosturtøkuráðgevi. Eisini ber til at fáa ráðgeving frá sálarfrøðingi, løgfrøðingi, sosialráðgeva ella øðrum viðkomandi fakfólki, sum eru knýtt at tilboðnum, og sum kunnu koma inn eftir tørvi. Mett verður, at ein slík vaktarskipan hóskar seg væl í einum lítlum landi sum Føroyum, har tað er trupult at manna eina skrivstovu hvønn dag. Hesin leisturin ger, at fakbólkar í nógv størri mun fara at arbeiða saman, og tað verður lættari at samskipa, at ein kvinna, sum umhugsar fosturtøku ella hevur fingið fosturtøku, fær ta hjálpina, henni tørvar. Hesin leistur ger eisini, at kvinnur í hesi truplu støðu hava eitt ávíst stað at venda sær til og sostatt sleppa frá at venda sær til fleiri ymisk støð og fáa somu spurningar endurtiknar upp í saman.

Ætlanin er eisini, at ráðgevingin hevur eina sjálvstøðuga heimasíðu við viðkomandi kunning, svar upp á ofta settar spurningar o.s.fr., soleiðis at borgarar sjálvir kunnu finna svar upp á teir spurningar, teir sita við, uttan at skulu ringja ella møta persónliga á einum ávísum stað. Um kvinnan hevur tørv á einari persónligari samrøðu, kann hetta verða skipað eftir nærri avtalu.

Hesin leistur byggir á verandi ráðgeving hjá Gigni. Ætlanin er, at ráðgevingin verður skipað sum ein sjálvstøðug fosturtøkuráðgeving undir Heilsutrygd. Tað verða heilsufrøðingar, sum eru fosturtøkuráðgevar hjá Gigni, sum svara telefonini.

Ætlanin er at kunna um tilboðið við eitt nú faldarum og lýsingarátøkum.

### *1.4.7. Aðrar skipanir og onnur lóggáva*

Eitt av endamálunum við lógaruppskotinum er at halda talið á fosturtøkum so lágt sum gjørligt.

Síðstu tretivu árini er talið av fosturtøkum minkað støðugt. Síðani miðskeiðis í 1990-árunum, tá ið talið lá millum 50 og 60 fosturtøkur árliga, er talið støðugt minkað niður móti 20-30 síðstu 10 árini. Í 2022 var talið 27. Tølini eru smá, so sveiggini eru stór frá einum ári til annað, men langtíðargongdin er greið.

Eisini tá ið fosturtøkurnar verða roknaðar lutfalsliga í mun til talið av livandiføddum, er myndin tann sama. Miðskeiðis í 1990-árunum vóru tað um 80-90 fosturtøkur fyri hvørji 1.000 livandi fødd, meðan talið í tíðarskeiðnum frá 2015-2020 minkaði niður á um 30-40. Í 2022 var talið 41,3 fyri hvørji 1.000 livandi fødd.

Tá hugt verður eftir aldursbýtinum, hevur gongdin seinastu árini verið tann sama sum í 1990 -árunum og fyrst í 00-unum. Lægsti títtleikin er hjá teimum yngstu kvinnunum, og so veksur tað til tað mesta í aldursbólkinum 25-29 ár, og minkar síðani stútt niður í lítið og onki hjá 40 ára gomlum og eldri.

Tað er nógv sum bendir á, at tað í Føroyum ikki eru tær heilt ungu kvinnurnar, sum fáa fosturtøku, men heldur kvinnur, sum hava familju og longu hava fingið børn.

Fyri at halda talið á fosturtøkum so lágt sum gjørligt, er tað neyðugt at flyta fokus frá forboði til upplýsing, og at fyribyrgja at kvinnan kemur í ta støðu, at hon verður við barn uttan at ætla tað og tí møguliga fer at umhugsa fosturtøku.

Aðalmálið er, at eingin kvinna skal fáa fosturtøku orsakað av fíggjarligum ella sosialum umstøðum. Neyðugt er tí eisini at tryggja, at sosialar skipanir og lóggávan rundan um virkar til fulnar, soleiðis at ein kvinna heldur enn at velja fosturtøku kann velja at eiga barnið.

Tey, sum hava verið á fundi í Løgmáláráðnum í sambandi við endurskoðanina av fosturtøkulógini, hava serliga víst á, at tørvur er á nøktandi seksualundirvísing, at endurskoða barsilsskipanina, at tryggja, at fólk hava nøktandi bústaðarviðurskifti og fáa nøktandi sosialar og fíggjarligar veitingar. Eisini hevur verið víst á, at hugt kann verða eftir aðrari lóggávu, so sum sterilisatiónslógini og ættleiðingarlógini.

*1.4.7.1. Seksualundirvísing*

Heilsukunning og seksualupplýsing koma undir kravdu undirvísingarevnini í fólkaskúlanum.

Landsstýrismaðurin í barna- og útbúgvingarmálum hevur greitt frá, at hann arbeiðir við at dagføra námsætlanina innan hesar lærugreinar á 1.-9. flokksstigi á fólkaskúlaøkinum og at fáa til vegar nýtt tilfar, har ymisk evni innan seksualundirvísing verða umrødd á ymiskan hátt.

Í námsætlanunum til høvuðslærugreinirnar, sum verða dagførdar nú, er seksualundirvísing partur av fleiri lærugreinum, og har er lagt upp fyri nýggjastu vitanini í teimum, soleiðis at tað kann verða undirvíst tvørtur um lærugreinir í hesum evninum. Ætlanin er, at námsætlanin skal leggja dent á lívfrøðiliga, sálarfrøðiliga, mentanarliga og samfelagsliga tilgongd til heilsu og trivnað.

Fyri at tryggja fakligheitina í hesum arbeiðinum, er arbeiðið skipað av NÁM og Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, og ætlanin er eisini at inndraga Gigni og ein fylgibólk av lærarum. Uppskot til námsætlanini er orðað, og ætlanin er at hava námsætlanina klára í apríl 2024.

Barna- og útbúgvingarmáláráðið arbeiðir eisini við eini ætlan um at hava heilsufrøðingar á Miðnámi. Ætlanin er, at evnir sum fyribyrging, at seta mørk og samtykki verða fevnd av tí, sum ein heilsufrøðingur kann arbeiða við á miðnámsskúlunum.

Endamálið við hesum er at tryggja, at ung fáa nøktandi kunning um kynslív og fyribyrging til bæði kvinnur og menn. Hesi átøk kunnu vera við til at forða fyri, at ein kvinna gerst við barn uttan at ætla tað.

*1.4.7.2. Barsilsskipanin*

Í nógv ár varð tað arbeitt fram ímóti, at barsilspeningur skuldi verða veittur í eitt ár eftir barnsburð og ættleiðing. Hetta málið varð rokkið í 2021. Harumframt bleiv barsilspeningur eftirlønargevandi í 2018.

Undir vanligum umstøðum hevur ein kvinna rætt til barsilspening í 4 vikur áðrenn mettan barnsburð og 14 vikur eftir barnsburð. Harumframt fær hon barsilspening í 34 vikur til býtis við pápan ella sammóðurina. Longdin á farloyvistíðini broytist tó eftir umstøðunum, sum kvinnan er í.

Barsilspeningurin er 100% av miðal mánaðarligu A-inntøkuni seinasta árið, áðrenn barsilsfarloyvið byrjar. Mesta útgjald er tó 25.000 kr. um mánaðin. Hevur kvinnan forvunnið minni, fær hon minni útgoldið. Hevur hon forvunnið meira, má hon mangla tann peningin, um hon ikki fær løn frá arbeiðsgevaranum í farloyvistíðini. Umframt barsilspening fær kvinnan eisini eftirløn sambært eftirlønarlógini.

Umhvørvismálaráðið hevur boðað frá, at ein endurskoðan av barsilslógini liggur fyri framman. Miðað verður eftir eini breiðari politiskari semju, umframt at partarnir á arbeiðsmarknaðinum verða tiknir upp á ráð í arbeiðinum.

Løgtingið hevur eisini fingið uppskot til broytingar í barsilslógini frá Umhvørvismálaráðnum, har skotið verður upp at hækka hámarkið fyri mánaðarligum barsilspeningi úr 25.000 kr. upp í 30.000 kr., og at nýútbúgvin skulu fáa betri treytir í barsilslógini. Ætlanin hjá landsstýrinum er at gera eina størri endurskoðan av barsilslógini í komandi tingsetu. Nakrir av spurningunum, ið Umhvørvismálaráðið fer at taka upp í sambandi við endurskoðanina av barsilslógini eru, um foreldur, ið fáa tvey ella fleiri børn við sama barnsburði ella ov tíðliga fødd børn, skulu fáa fleiri vikur við barsilspeningi, um Barsilsskipanin skal gerast smidligari, og um eitt minsta útgjald skal veitast úr Barsilsskipanini til tey, ið ikki hava eitt útrokningargrundarlag sambært barsilslógini í dag.

*1.4.7.3. Bústaðartrot*

Bústaðarviðurskifti hava stóran týdning fyri møguleikarnar hjá einari familju at skapa góðar karmar fyri uppvøksturin hjá børnunum.

Umhvørvismálaráðið hevur upplýst, at arbeiðið at økja um bústaðamongdina heldur fram m.a. við at styrkja um virkisførið hjá Húsalángrunninum at útvega leigubústaðir og við at geva kommununum loyvi til saman við Húsalángrunninum at kunnu útvega leigubústaðir.

Fyri 80% av vanligu leigubústøðunum, sum verða útvegaðir við heimild í løgtingslóg um Húsalánsgrunn, er galdandi, at teir vera útlútaðir eftir tørni og ikki við støði í tørvsmeting.

Fyri 20% av leigubústøðunum, sum almenn bústaðafeløg, herundir Bústaðir, útvega, er galdandi, at Almannaverkið hevur ávísingarrætt til hesar eftir reglum, sum verða ásettar av

landsstýrismanninum, og sum skulu taka atlit at tørvi borgarans, og hvussu leigaraskarin annars er samansettur. Sí § 24 b, stk. 1-3, í leigulógini.

Treytirnar fyri ávísing av leigubústøðum sambært § 24 b, stk. 1 í leigulógini eru ásettar í kunngerð nr. 90 frá 1. juli 2019 um bráðtørvslista til hýsing av persónum, ið hava ein bráðfeingis bústaðartørv.

*1.4.7.4. Almennar veitingar*

Fíggjarligur tryggleiki hevur stóran týdning hjá barnafamiljum, og seinastu árini er bøtt um stuðulsveitingarnar til barnafamiljur.

Løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er niðasta trygdarnetið, sum loftar teimum, sum detta niður í millum aðrar skipanir. Sambært løgtingslógini hava borgarar undir ávísum treytum rætt til eitt nú fyribils uppihaldsveiting, familjuískoyti, barnaískoyti til stakar uppihaldarar og barnafrádrátt. Sambært lóg um børns retsstilling hava foreldur, sum hava børn búgvandi, eisini rætt til barnagjald.

Sambært løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er innistandandi peningur hægri enn 30.000 kr. at rokna sum eitt uppihaldsgrundarlag. Hetta merkir, at tey, sum hava lagt pening til síðis og hava eina uppsparing, ikki hava rætt til fyribils uppihaldsveiting.

Landsstýriskvinnan í almanna- og mentamálum hevur í svari upp á skrivligan fyrispurning nr. 52-022/2023 boðað frá, at lóggávan kann tillagast soleiðis, at m.a. treytirnar um ogn í sambandi við fyribils uppihaldsveiting vegna barnsburð verða broyttar.

Tey flestu, sum fáa børn í Føroyum, fáa veiting frá barsilsskipanini. Tey, sum eru lesandi, og sum tí ikki hava nakað inntøkugrundarlag í barsilsskipanini, fáa lestrarstuðul og barnastuðul frá Studna.

*1.4.7.5. Sterilisatión*

Reglur um sterilisatión og kastratión eru ásettar í lov om sterilisation og kastration, sum er sett í gildi við kongelig anordning nr. 73 frá 14. marts 1968, og sum seinast er broytt við løgtingslóg nr. 78 frá 29. mai 2017.

Sambært lógini kann sterilisatión bara verða loyvd undir nærri ásettum treytum. Tað er sterilisatiónsnevndin, sum tekur avgerð um, hvørt loyvi kann verða givið ella ikki.

Er kvinnan gift og livir saman við hjúnafelaganum, skal ein váttan innheintast frá hjúnafelaganum uttan so, at serlig viðurskifti tala í móti hesum. Tað sama er galdandi fyri mannin.

Eins og við fosturtøkulógini er talan um eina gamla og ótíðarhóskandi lóg.

Spurningurin um sterilisatión er fyrst og fremst ein spurningur av persónligum slagi heldur enn ein læknalig viðgerð fyri sjúku. Í flestu førum er tað helst eingin ivi um, at ein kvinna sjálv kennir sína støðu best og sostatt er tann, sum er best før fyri at taka avgerð um, hvørt hon skal hava børn, ella um hon skal hava fleiri børn.

Sterilisatiónslógin kundi verið broytt og nútíðmansgjørd fyri at forða fyri, at ein kvinna kemur í eina støðu, har hon verður við barn uttan at ætla tað, og tí fer at umhugsa fosturtøku. Kvinnur kundu tí fingið lættari atgongd til sterilisatión, t.d. uttan loyvi og eftir at hava umhugsað støðuna í eina tíð. Umráðandi er, at man frá almennari síðu tá hevur eitt tilboð til hesar kvinnur, har tær kunnu fáa góða ráðgeving og vegleiðing frá fakfólki, soleiðis at tær kunnu taka eina væl grundaða avgerð um teirra støðu á einum væl upplýstum grundarlagi.

*1.4.7.6. Ættleiðing*

Í sambandi við arbeiðið at endurskoða fosturtøkulógina hava fleiri víst á, at ættleiðingarlógin kundi verið tillagað, soleiðis at ein kvinna heldur enn fosturtøku kann velja at burturættleiða barnið.

Føroyar eru eitt lítið samfelag, og tað kann vera trupult at burturættleiða eitt barn til innanlands ættleiðing. Foreldur, sum burturættleiða eitt barn, antin við tvingsli ella samtykki, kunnu sum nú er seta fram ynski um, at barnið ikki verður ættleitt til Føroyar, men heldur til Danmarkar. Somuleiðis kunnu foreldur seta fram ynski um, at eitt barn skal ættleiðast til onkran í Føroyum.

Við undantaki av familjuættleiðingum, har eitt mál var skrásett í 2017 og eitt í 2022, er Familjufyrisitingin ikki vitandi um, at nakað barn búgvandi í Føroyum er ættleitt av føroyingum sambært ættleiðingarlógini. Familjuættleiðing er ættleiðing av børnum, sum eru nær í familju við tey sum ættleiða, ella hava eitt serligt tilknýti til tey sum ættleiða, eitt nú fosturbørn, ið eru umsorganaryvirtikin við samtykki ella við tvingsli.

Tað eru ongar beinleiðis forðingar í galdandi lóggávu fyri, at føroyingar kunnu ættleiða føroyingar.

Um eitt barn skal ættleiðast innanlands, sendir Familjufyrisitingin málið til Adoptionsnævnet í Danmark. Adoptionsnævnet velur síðani millum góðkend ættleiðingarforeldur, ið kunnu vera føroyingar ella danskarar, hvørji ættleiðingarforeldur eru best skikkaði til at ættleiða barnið.

Um samtykki til burturættleiðing er latið, og barnið skal ættleiðast av einum ávísum umsøkjara, viðger Familjufyrisitingin málið uttanum Adoptionsnævnet.

Er eitt barn ættleitt, kann Familjufyrisitingin sambært § 23 í løgtingslóg um foreldramyndugleika og samveru eftir umbøn áseta samveru ella annað samband við uppruna skyldfólk. Tað er rætturin hjá barninum til samveru, sum er avgerandi sambært ásetingini, og ikki rætturin hjá uppruna skyldfólkunum.

Í Grønlandi er støðan tann, at grønlendska umsitingin sjálv umsitir innanlands listan av børnum leysgivin til fremmandaættleiðing í Grønlandi.

Ásetingarnar um tvingsilsættleiðing í galdandi ættleiðingarlóg eru munandi øðrvísi enn í Danmark. Tað kemst av, at ásetingarnar viðvíkjandi tvingsilsættleiðing eru broyttar nakrar ferðir gjøgnum tíðina í Danmark, men hesar broytingar vórðu ikki settar í gildi fyri Føroyar. Í sambandi við yvirtøkuna av familjurættarliga økinum vóru ásetingarnar um tvingsilsættleiðing ei heldur broyttar.

Landsstýrismaðurin er sinnaður at kanna, um tørvur er á smidligari skipanum og um neyðugt at gera broytingar í ættleiðingarlógini í hesum sambandi.

### *1.4.8. Revsing*

Galdandi fosturtøkulóg heimilar, at kvinnan kann verða dømd fongsulsrevsing fyri at hava fingið framt fosturtøku, uttan at lógarásettu treytirnar fyri fosturtøku eru loknar, eins og kvinnan kann verða dømd fongsulsrevsing, um hon letur ein persón, sum ikki er lækni, fremja fosturtøku. Pápin at barninum kann verða revsaður, um hann eftir umbøn ikki vil veita kvinnuni fíggjarligan ella persónligan stuðul, og tað verður prógvað, at hetta hevur viðvirkað til, at kvinnan hevur fingið framt fosturtøku.

Somuleiðis kunnu læknar, sum fremja fosturtøku ella hjálpa við at fremja fosturtøku, uttan at lógarásettu treytirnar fyri fosturtøku eru loknar, verða dømdir fongsulsrevsing, eins og persónar, sum ikki eru læknar, men kortini fremja fosturtøku, kunnu verða dømdir fongsulsrevsing.

Endamálið við revsiásetingunum er at forða fyri, at fosturtøka verður framd, uttan at lógarásettu treytirnar eru loknar. Út frá hesum sjónarmiðinum verður hildið fast við, at tann, sum fremur fosturtøku ella hjálpir við at fremja fosturtøku uttan, at lógarásettu treytirnar eru loknar, kann revsast fyri tað.

Havandi í huga, at hóttanin um revsing má metast at vera uttan serliga fyribyrgjandi virknað, at revsiábyrgd fyri kvinnuna kann virka órímilig, og at revsiásetingin ikki hevur verið brúkt, verður revsiábyrgd fyri kvinnuna ikki ásett. Tað sama er galdandi fyri pápan at barninum.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið er lagt á almenna hoyringarportalin og á heimasíðuna hjá Løgmálaráðnum til almenna hoyring.

Uppskotið er sent beinleiðis til ummælis hjá:

- Frítt Val
- Føroya Pro Vita
- Mammuhjálpini
- Gigni
- Ljósmøðrafelag Føroya
- Serlæknafelag Føroya
- Kommunulæknafelag Føroya
- Etiska ráðnum
- Javnstøðunevndini
- Almannaverkinum
- Felagið fyri føroyskir sálarfrøðingar
- MEGD
- Amnesty International Føroyar
- Sosialráðgevarafelag Føroya
- Stjórnarráðunum
- Fútanum

- Advokatfelag Føroya
- Føroya Kærustovni
- Sjúkrahúsverkinum
- Familjufyrisitingini

Ummælistíðin var frá 8. januar 2024 til 5. februar 2024.

Tá ið ummælisfreistin var úti, vóru viðmerkingar komnar frá Suðuroyar Sjúkrahúsi, Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, Føroya Kærustovni, Føroya Pro Vita, Mammuhjálpini, MEGD, Frítt Val, Almanna- og mentamálaráðnum, Heilsumálaráðnum, Heilsutrygd og Gigni, Amnesty Føroyar, Sosialráðgevarafelag Føroya, Etiska ráðnum, Kvinnufelagnum í Havn, Javna, Javnstøðunevdini, Familjufyrisitingini og Landssjúkrahúsinum.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, Fíggjarmálaráðið, Umhvørvismálaráðið og Barna- og útbúgvingarmálaráðið hava boðað frá, at tey ikki hava viðmerkingar til uppskotið.

Ummælisskjalið er lagt við sum fylgiskjal 1.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Sambært uppskotinum kunnu kvinnur uttan loyvi fáa fosturtøku, um fosturtøkan kann verða framd áðrenn endan av 12. viku. Somuleiðis kunnu kvinnur fáa fosturtøku eftir 12. viku undir nærri ásettum treytum.

Uppskotið fer helst at hava við sær, at talið á fosturtøkum í fyrstu atløgu kvinkar eitt vet upp eftir, av tí at sonevndu skuggatølini fara at verða ein partur av almennu hagtølunum. Soleiðis sum gongdin hevur verið seinastu nógvu árini, verður tó væntað at talið á fosturtøkum stillar seg aftur.

Sambært uppskotinum setir landsstýrisfólkið eitt samráð at taka avgerðir um, hvørt loyvi kann verða givið til fosturtøku eftir 12. viku, og um kvinnur undir 18 ár kunnu fáa fosturtøku uttan samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan. Samráðið hevur fimm limir.

Limirnir í samráðnum fáa samsýning sambært umfarsskrivi um nevndarsamsýningar hjá Fíggjarmálaráðnum, umframt koyripengar, alt eftir hvar limirnir búgva.

Avgerðirnar hjá samráðnum kunnu leggjast fyri Føroya Kærustovn.

Serkøn hjá Føroya Kærustovni fáa sambært § 9, stk. 4 í løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn løn ella samsýning sum landsstýrisfólkið ásetir.

Sambært uppskotinum skal kvinnan hava í boði ráðgeving og stuðulssamrøðu bæði fyri og eftir eina møguliga fosturtøku. Fosturtøkutalið hevur seinastu árini ligið um 30 um árið, og verandi ráðgeving hjá Gigni hevur verið brúkt 5-6 ferðir um árið.

Neyðugt verður eisini við játtan til eingangsútreiðslur til at menna eina heimasíðu, ið er atkomulig fyri øll, eins og peningur eigur at verða settur av til at framleiða kunnandi tilfar, so sum faldarar, lýsingarátøk og annað.

Mett verður, at neyðugt er at seta umleið 150.000 kr. av til omanfyri nevndu endamál.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur stórvegis umsitingarligar avleiðingar við sær.

Sambært uppskotinum kann fosturtøka undir ávísum treytum verða framd eftir 12. viku. Hetta hevur umsitingarligar avleiðingar við sær, við tað at eitt samráð skal meta um, hvørt treytirnar fyri at fáa fosturtøku eru loknar ella ikki. Samráðið skal somuleiðis lata landsstýrisfólkinum eina ársfrágreiðing um virksemi sítt.

Uppskotið hevur eisini umsitingarligar avleiðingar fyri Føroya Kærustovn, sum verður kærumyndugleiki. Avgerð samráðið, at treytirnar fyri fosturtøku ikki eru loknar, skal samráðið beinanvegin senda avgerðina til Føroya Kærustovn saman við grundgeving fyri avgerðini.

Tær flestu fosturtøkurnar í Føroyum verða framdar áðrenn 12. viku, og hetta fer tí at lætta um umsitingina av økinum.

Sambært uppskotinum skal kvinnan hava í boði ráðgeving og stuðulssamrøðu bæði fyri og eftir eina møguliga fosturtøku, og læknin, sum fær eina umsókn um fosturtøku, skal upplýsa kvinnuna um hesar møguleikar.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur við sær eina uppraðfesting av rættindum hjá kvinnum.

Allar kvinnur verða eins fyri lógini, og uppskotið er eisini við til at forða fyri, at kvinnur koma illa fyri av ólógligum og ótryggum fosturtøkum uttan vegleiðing frá lækna, eins og sosiali ójavnin minkar, av tí at tað ikki verður neyðugt at fara uttanlands at fáa fosturtøku.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá kvinnum (kvinnurættindasáttmálanum) er staðfest, at kvinnur sjálvar hava rætt til at gera av, um tær vilja hava børn, hvussu nógv børn tær vilja hava, nær tær vilja hava børn og við hvørjum. Í 1987 samtykti Løgtingið at seta sáttmálan í gildi fyri Føroyar, og sáttmálin er sostatt fólkarættarliga bindandi fyri Føroyar.

Nevndin hjá ST, sum varðar av kvinnurættindum, hevur heitt á myndugleikarnar í Føroyum um at endurskoða fosturtøkulógina, og ST hevur boðað frá, at tað er ein trupulleiki, at kvinnur í Føroyum ikki sjálvar kunnu avgera, um tær ynskja fosturtøku ella ikki.

Við uppskotinum kunnu kvinnur sjálvar gera av, um tær ynskja fosturtøku ella ikki, um inntrivið kann verða framt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini.

Í Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek, er staðfest, at persónar við breki ikki á nakran hátt mugu vera fyri mismuni. Um fosturtøka orsakað av úrsliti frá sjúkugreining í móðurlívi elvir til mismun móti fólki við ávísum breki, kann hetta vera í ósamsvari við sáttmálan.

Sambært uppskotinum kann fosturtøka verða framd eftir 12. viku, um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku, undir hesum álvarslig avskap.

Hvussu álvarslig avskap ella sjúku talan er um skal eitt nú metast út frá upplýsingum um støðu og útlit hjá fostrinum, viðgerðarmøguleikum, váðan við skurðviðgerðum, væntað tal á skurðviðgerðum, vandi fyri eftirsjúku umframt møguleikunum hjá barninum at fáa vanligt virkisføri o.ø.

Talan er sostatt altíð  um eina ítøkiliga og læknaliga meting.

Í Evropeiska mannarættindasáttmálanum er staðfest, at ein og hvør hevur rætt til lív. Mannarættindadómstólurin hevur viðgjørt spurningin um status og verju hjá einum fostri undir sáttmálanum. Meginreglan í siðvenju hjá dómstólinum er, at ófødd ikki eru vard av rættinum til lívið. Semja er tó ikki um status hjá fostrinum og meira yvirskipað um, nær lívið byrjar.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Uppskotið er ikki í andsøgn við Hoyvíkssáttmálan, Evropeiska mannarættindasáttmálan (EMRS) ella Sáttmála Sameindu Tjóða hjá einstaklingum, ið bera brek.

**2.9. Markaforðingar**
Uppskotið hevur ikki nýggjar markaforðingar við sær.

**2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv**
Sambært § 18, stk. 1, kunnu læknar, sum fremja fosturtøku, uttan at lógarásettu treytirnar fyri fosturtøku í §§ 1 og 2 eru loknar, revsast við fongsli í upp til 2 ár, undir linnandi umstøðum við sekt.

Sambært § 18, stk. 2, kunnu læknar, sum fremja fosturtøku uttan at treytirnar í §§ 8 og 9 og § 10, stk. 2 eru loknar, revsast við sekt.

Sambært § 18, stk. 3, kunnu persónar, sum ikki eru læknar, og sum fremja fosturtøku, revsast við fongsli í upp í 4 ár.

Nevndu ásetingar verða sambært § 18, stk. 4, brúktar á sama hátt fyri tann, sum hjálpir til við slíkum virksemi.

Sambært § 19 verða lógarbrot, sum eru framd av ósketni, ikki revsaði.

**2.11. Skattir og avgjøld**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar

**2.12. Gjøld**
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

**2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?**
Sambært § 10 skal ein lækni, sum fær eina umsókn um fosturtøku, upplýsa kvinnuna um møguleikan fyri ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Ráðgevingin skal m.a. fevna um møguleikarnar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina og fyri stuðli eftir, at barnið er føtt.

Læknin skal somuleiðis vegleiða og kunna um inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið. Metir læknin, at treytirnar fyri fosturtøku í §§ 1 og 2 ikki eru loknar, skal læknin beinanvegin leggja umsóknina saman við sínum úttalilsi fyri samráðið.

Avger samráðið, at treytirnar fyri fosturtøku ikki eru loknar, skal samráðið sambært § 16 beinanvegin senda avgerðina til Føroya Kærustovn saman við grundgeving fyri avgerðini.

**2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?**
Í § 7, stk. 2, verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um ráðgevingina.

Í § 13 verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um umsókn um fosturtøku og um viðgerð av málum um fosturtøku.

Í § 14, stk. 1 verður heimilað landsstýrisfólkinum at seta samráðið, sum tekur avgerð um, hvørt fosturtøka kann verða loyvd eftir 12. viku.

Í § 14, stk. 4, verður heimilað landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Uppskotið hevur ongar slíkar avleiðingar.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Sambært uppskotinum kunnu kvinnur sjálvar taka avgerð um, hvørt tær vilja hava fosturtøku, um inntrivið kann verða framt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini.

Flest allir hoyringarpartar, sum hava verið á fundi í Løgmálaráðnum í sambandi við endurskoðan av fosturtøkulógini vóru samdir um, at rætturin hjá kvinnuni til sjálv at taka avgerð um fosturtøku, eigur at verða ásettur við lóg, undir hesum eisini ein samd Javnstøðunevnd.

Tá tað ræður um spurningin um fosturtøku, er talan um tríggjar partar, sum hava ella kunnu hava mótstríðandi áhugamál. Tað ber tí ikki til at geva øllum pørtum javngóðan rætt. Í hesi støðuni má mann velja, hvørs áhugamál mugu takast fram um hini.

Í hesum uppskotinum er valt, at atlitið at kvinnuni má viga tyngst og ganga framum hini, tí tað er hon, sum gongur við barninum og hennara viðurskifti, sum beinleiðis verða ávirkaði. Í øðrum lagi er atlitið at barninum raðfest á tann hátt, at fosturtøka eigur at vera framd so tíðliga sum til ber í viðgongutíðini, og at fosturtøka eftir 12. viku bara kann vera framd undir nærri ásettum treytum og við loyvi frá einum samráði.

Atlitið at rættinum hjá pápanum kemur í øðrum lagi og má víkja fyri atlitunum at kvinnuni.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | [redacted] | Nei | Ja | [redacted] |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1.** *Fosturtøka áðrenn endan av 12. viku krevur ikki loyvi*
Ásett verður, at ein kvinna kann fáa fosturtøku áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini, tað vil siga 11 vikur og 6 dagar ella til og við viku 11+6.

Av tí at tað er kvinnan, sum avger, um hon vil hava fosturtøku, krevst einki loyvi at fáa fosturtøku, um inntrivið kann verða framt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini. Hetta er ikki galdandi, um kvinnan ikki er før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, sambært § 8, stk. 2, ella um kvinnan er undir 18 ár, sambært § 9, stk. 2-3.

Freistin verður vanliga roknað frá fyrsta degi í seinastu menstruatión. Tað vil siga, at freistin upp á 12 vikur vanliga fer umleið 10 vikur eftir gitnað.

Um hendan freistin er farin, verður avgjørt út frá upplýsingunum frá kvinnuni umframt eini undirlívskanning og eini ultraljóðskanning, sum ein serlækni í kvinnusjúkum ger.

Tað er ein serlækni í kvinnusjúkum, sum avger, um freistin er farin. Um læknin metir, at freistin er farin, skal hann beinanvegin vegleiða kvinnuna um møguleikarnar fyri at søkja um loyvi til fosturtøku frá samráðnum, og um kvinnan biður um tað, beinanvegin leggja umsóknina um fosturtøku fyri samráðið. Læknin kann sostatt ikki bara nokta at fremja inntrivið.

Við øllum læknaligum inntrivum kunnu læknaligar orsakir tala fyri, at inntrivið ikki eigur at verða framt. Tað er yvirlæknin, sum metir um hetta.

Sambært ásetingini skal kvinnan hava í boði kunning um tilboð um ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Somuleiðis skal kvinnan eisini hava kunning um inntrivið, fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til § 7 og § 10.

Læknin hevur skyldu at tryggja sær, at kvinnan fær hesa kunning og vegleiðing. Tað er tó ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan hevur tikið av teimum tilboðum, sum eru tøk.

Tað er ein treyt fyri at fáa fosturtøku eftir § 1, at kvinnan býr í Føroyum. Hetta merkir, at hon skal verða skrásett í landsfólkayvirlitinum við bústaði í Føroyum.

**Til § 2.** *Fosturtøka eftir 12. viku sum ikki krevur loyvi: Lív og heilsa í vanda.*
Ásett verður, at ein kvinna kann fáa fosturtøku uttan loyvi, hóast freistin upp á 12 vikur er farin. Tað er í førum, har lív og heilsa kvinnunnar er í vanda, ella um inntrivið er neyðugt fyri at forða fyri, at likamliga og sálarliga heilsan hjá kvinnuni viknar munandi, og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður. Tað vil siga, at tað skal vera ein læknalig orsøk, og tað skal vera ein yvirlækni, sum tekur avgerðina.

Ásetingin fevnir um tey føri, har læknalig atlit í sær sjálvum eru nóg mikið til at grunda eina fosturtøku. Tað er yvirlæknin á sjúkrahúsinum, sum tekur avgerð, um fosturtøka skal

fremjast, um álvarsligi vandin fyri lívi og heilsu kvinnunnar er grundaður á sjúku, og hetta er staðfest á sjúkrahúsinum.

Tað er nóg mikið, at fosturtøka verður mett neyðug fyri at forða fyri, at kvinnan kemur í lívsvanda. Hóast tað ikki er stórur vandin fyri, at viðgongutíðin ella føðingin kann elva til, at kvinnan doyr, eigur hon ikki at verða noydd at fullføra viðgongutíðina, um vanligi vandin í viðgongutíðini og føðingini er øktur.

Avgerandi er, um heilsan viknar munandi og álvarsliga. Hetta merkir tó ikki, at dentur ikki skal leggjast á, hvussu stórur vandin er. Meðan tað við sera álvarsligum sjúkum ikki skulu setast stór krøv til, hvussu stórur vandin er, kann tað í øðrum førum vera umráðandi at meta um, hvussu stórur vandin er fyri, at heilsan viknar.

Ásetingin fevnir bæði um likamligu og sálarligu heilsuna hjá kvinnuni, og tað er ein treyt, at vandin fyri at heilsan viknar er læknaliga grundaður. Tað er ikki neyðugt, at virkandi læknin sjálvur hevur staðfest vandan, men viðkomandi lækni kann brúka eina váttan frá einum øðrum lækna sum grundarlag, t.d. frá einum serlækna í psykiatri. Læknaváttanin kann eisini koma frá einum, sum ikki starvast á sjúkrahúsinum, og hon kann eisini verða gjørd, áðrenn kvinnan varð innløgd á sjúkrahúsinum.

Øvut treytunum í §§ 1 og 3 um at kvinnan skal búgva í Føroyum, er hetta ikki galdandi fyri fosturtøku eftir § 2, sum eisini fevnir um kvinnur, sum ikki hava bústað í Føroyum. Orsøkin er, at fosturtøka eftir § 2 er grundað á, at lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda, og at inntrivið er neyðugt fyri at forða fyri, at likamliga og sálarliga heilsan hjá kvinnuni viknar munandi, og at vandin er læknaliga grundaður. Talan er um inntriv, sum má metast at vera bráðneyðugt og ikki kann bíða, til kvinnan er komin aftur til heimland sítt.

**Til § 3.** *Loyvi til fosturtøka eftir 12. viku.*
Er freistin upp á 12 vikur farin, kann eitt samráð geva loyvi til fosturtøku, um treytirnar í § 3 eru loknar. Tað kunnu vera fleiri orsakir til, at ein kvinnan søkir um at fáa fosturtøku. Loyvi kann tí gevast til fosturtøku, hóast treytirnar ikki eru loknar til fulnar eftir eini ávísari áseting, um grundarlag er fyri at geva loyvi sambært í minsta lagi tveimum av ásetingunum, og ein samlað meting av viðurskiftunum talar fyri, at loyvi verður givið til fosturtøku.

Tað er eisini ein treyt fyri at fáa fosturtøku eftir § 3, at kvinnan býr í Føroyum. Hetta merkir, at hon skal verða skrásett í landsfólkayvirlitinum við bústaði í Føroyum.

*Til nr. 1. Vandi fyri at heilsan hjá kvinnuni viknar.*
Ásett verður, at fosturtøka kann verða framd um viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum hevur við sær vanda fyri, at heilsan hjá kvinnuni viknar orsakað av verandi sjúku ella hóttandi likamligari ella sálarligari sjúku ella ómegdarstøðu, ella av lívsviðurskiftum hennara aðramáta. Fosturtøka kann sostatt verða loyvd av læknaligum og samfelagsligum orsøkum.

Neyðugt er at kanna persónligu og sosialu viðurskiftini hjá kvinnuni nærri fyri at meta um vandan fyri heilsuni hjá kvinnuni. Samráðið kann í hesum sambandi kalla kvinnuna inn til eina samrøðu.

Ásetingin fevnir ikki um føri, har lív og heilsa kvinnunar er í vanda. Tá er støðan fevnd av § 2, og fosturtøka kann tá verða framd uttan loyvi frá samráðnum. Tað er tó einki til hindurs

fyri, at samráðið gevur loyvi til fosturtøku sambært hesi áseting, um staðfest verður, at lív og heilsa kvinnunnar er í vanda.

Tað er ikki bara avgerandi, hvussu stórur vandin er fyri heilsuni hjá kvinnuni, men eisini hvønn ítøkiliga vandan talan er um. Tað er sostatt ikki ein og hvør vandi fyri heilsuni, sum kann grunda loyvi til eina fosturtøku. Avgerðin má takast við støði í einari ítøkiligari meting um, hvønn vanda talan er um, samanhildið við, hvussu stórur vandin er fyri, at heilsan hjá kvinnuni viknar.

Er ynskið um fosturtøku grundað á sálarligu støðuna hjá kvinnuni, eigur samráðið at fáa eina kanning gjørda hjá serlækna í psykiatri, sum skal lýsa serligu umstøðurnar nærri. Um tað ikki kann staðfestast, at kvinnan í løtuni ikki er í einari svárari sálarligari støðu, eru treytirnar fyri at loyva fosturtøku ikki uppfyltar.

Støða kann tá verða tikin til, um treytirnar sambært § 3, nr. 5 eru loknar. Víst verður til viðmerkingarnar til hesa greinina.

*Til nr. 2. Barnsburður íkomin orsakað av kynsligum brotsverki*
Ásetingin hevur við sær, at loyvi kann verða givið til fosturtøku av etiskum orsøkum, tað er um kvinnan er vorðin við barn orsakað av t.d. neyðtøku ella blóðskemd.

Víst verður til § 210 og §§ 216-224 í revsilógini, Løgtingslógarkunngerð nr. 8 frá 20. februar 2024 um revsing.

Tað er ikki ein treyt fyri at fáa loyvi til fosturtøku sambært hesi áseting, at brotsgerðin hevur verið tilætlað. Ásetingin fevnir sostatt eisini um føri, har talan er um ósketni. Loyvi kann eisini verða givið, hóast brotsmaðurin verður fríkendur av subjektivum orsøkum, ella hann av øðrum grundum ikki kann revsast, t.d. um hann er undir 15 ár.

Samráðið skal tryggja sær, at málið verður væl lýst, og at talan eftir øllum líkindum veruliga er um brot á § 210 og §§ 216-224 í revsilógini. Hetta kann eitt nú verða gjørt við at hava eina samrøðu við kvinnuna og kanna, um kvinnan hevur verið á neyðtøkumóttøkuni á Landssjúkrahúsinum.

Tað er ikki ein treyt, at brotsverkið er meldað til løgregluna. Hetta tí at ein slík treyt viðvirkar til at fløkja og seinka málsviðgerðina, og vandi kann tí vera fyri, at inntrivið ikki verður framt so tíðliga í viðgongutíðini sum gjørligt.

Ásetingin fevnir eisini um støður, har ein genta undir 15 ár er vorðin við barn.

*Til nr. 3. Barnið álvarsliga sjúkt í móðurlívi*
Loyvi kann verða givið til fosturtøku um vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku.

Tað er ikki ein treyt, at talan altíð skal vera um ein nærliggjandi vanda fyri álvarsligari sjúku. Hvussu stórur vandin skal vera fyri, at loyvi til fosturtøku kann verða givið, veldst um, hvønn vanda talan er um. Er talan um sera álvarsliga sjúku, eiga ov stór krøv ikki at vera sett til vandan, meðan hinvegin minni álvarslig sjúka bara kann grunda eina fosturtøku, um talan er um rættiliga stóran vanda.

Viðurskifti, sum ikki eru ein vandi fyri virkisførið hjá fostrinum seinni í lívinum, eru sostatt sum meginregla ikki grundarlag fyri at geva loyvi til fosturtøku.

Kravið um, at talan skal vera um álvarsliga sjúku, skal metast saman við § 4, har loyvi til fosturtøku bara kann verða givið, um tey viðurskifti, sum grunda eina umsókn um fosturtøku, standa mát við heilsuliga vandan, sum eitt inntriv eftir 12. viku í viðgongutíðini hevur við sær.

Hvussu álvarsliga sjúku talan er um, skal eitt nú metast út frá upplýsingum um støðu og útlit hjá fostrinum, viðgerðarmøguleikum, váðan við skurðviðgerðum, væntað tal á skurðviðgerðum, vanda fyri eftirsjúku umframt møguleikunum hjá barninum at fáa vanligt virkisføri. Ásetingin fevnir sostatt eisini um álvarslig avskap. Aktuellu viðgerðarmøguleikarnir hava eisini týdning í hesum sambandi, og tí er læknafrøðiliga menningin og tøki serkunnleikin eisini við til at staðfesta, nær loyvi kann gevast og ikki.

Talan er um eina ítøkiliga og læknafakliga meting, sum verður gjørd út frá støðuni hjá einstaka fostrinum og ikki út frá samfelagsligum atlitum.

Tað er ikki ein treyt, at tað er staðfest, at fostrið hevur eina sjúku. Tað er sostatt nóg mikið, at vandi er fyri, at fostrið hevur eina álvarsliga sjúku. Tað ber í tí sambandi ikki til at siga nakað ítøkiligt um, hvussu stórur vandin skal vera, men tað er ein treyt, at tann ítøkiligi vandin fyri, at fostrið mennir eina ávísa sjúku, er munandi hægri enn vanligi vandin millum fólk at fáa sjúkuna.

*Til stk. 1, nr. 4. Kvinna megnar ikki at taka sær av barninum orsakað av sjúku ella menningartarni*
Loyvi kann verða givið til fosturtøku, um kvinnan orsakað av likamligari ella sálarligari sjúku ella sálarligum menningartarni ikki megnar at hava umsorgan fyri barninum.

Talan kann vera um støður, har kvinnan ber so álvarslig brek ella er so álvarsliga likamliga sjúk ella sálarsjúk, at hetta avmarkar hennara førleikar til at røkja dagligar uppgávur, og at hon sostatt ikki er før fyri at taka sær av einum barni.

Í metingin av, um kvinnan megnar at hava umsorgan fyri barninum ella ikki, skal dentur leggjast á, um sjúkan er av slíkum slag, at hon forðar kvinnuni í at hava umsorgan fyri barninum á fullgóðan hátt. Tað er tí minni avgerandi, um sjúkan annars er at meta sum álvarslig fyri kvinnuna sjálva.

*Til stk. 1, nr. 5. Sosialar umstøður.*
Loyvi kann verða givið til fosturtøku, um viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum má metast at elva til eina álvarsliga byrðu fyri kvinnuna. Ásetingin merkir, at loyvi kann verða givið til fosturtøku orsakað av sosialu umstøðunum hjá kvinnuni.

Ásetingin er ætlað í førum, har viðgongutíðin, føðingin ella umsorganin fyri barninum fer at verða ein slík byrða fyri kvinnuna, at ein samlað meting av viðurskiftunum grunda eina fosturtøku, hóast tað í støðuni ikki er vandi fyri heilsuni hjá kvinnuni.

Tað er ikki bara atlit at kvinnuni, sum kann grunda eina fosturtøku, men eisini atlit at øðrum børnum í familjuni, og at tey fáa eina fullgóða uppaling. Her verður bæði hugsað um

felagsbørn og serbørn. Tað sama er galdandi, um vandi er fyri, at kvinnan ikki megnar at halda uppi húsi og heimi sínum, um hon fær eitt barn.

Aldurin á kvinnuni kann hava týdning fyri ta byrðu, sum hon verður útsett fyri í viðgongutíðini. Jú eldri kvinnan er, jú størri dentur kann verða lagdur á aldurin.

Tann byrðan, sum viðgongutíðin og føðingin elva til, valdast í stóran mun ta byrðu, sum longu liggur á kvinnuni. Her er serliga talið av og aldurin á børnum, sum kvinnan frammanundan eigur, avgerandi, eins og hennara møguleikar fyri at fáa hjálp hava týdning. Av øðrum persónligum viðurskiftum, sum hava týdning, kunnu nevnast heilsan hjá kvinnuni, hennara familjustøða, um hon er gift ella samlivandi ella um hon er einsamøll við børnunum.

Bústaðarviðurskifti hava stóran týdning fyri møguleikarnar hjá einari familju at skapa góðar karmar fyri uppvøksturin hjá børnum. Tað sama er galdandi fyri fíggjarlig viðurskifti, men eisini álvarslig sjúka ella avlamni hjá einum í familjuni kann seta slík krøv til kvinnuna, at hon ikki megnar eisini at ansa einum smábarni, uttan at hetta í órímiliga stóran mun gongur út yvir kvinnan sjálva ella onnur børn í familjuni.

Talan er altíð um eina heildarmeting, har øll viðkomandi viðurskifti skulu takast við í metingina. Uppreksanin av teimum nevndu viðurskiftunum er sostatt ikki úttømandi. Tað verður beinleiðis nevnt í ásetingini sum ein treyt fyri at fáa loyvi til fosturtøku, at kvinnan kann ikki sleppa undan byrðuni á annan hátt. Í tann mun almenn tilboð eru, sum kunnu bøta um viðurskiftini og lætta munandi um byrðuna, talar hetta ímóti at geva loyvi til fosturtøku. Her verður eitt nú hugsað um sosialan, fíggjarligan og persónligan stuðul.

**Til § 4.** *Orsøkin til fosturtøku má standa mát við heilsuliga vandan við inntrivinum*
Í ásetingini er nágreinað, at loyvi til fosturtøku kann bara verða givið, um tey viðurskifti, sum grunda eina umsókn um fosturtøku, standa mát við heilsuliga vandan, sum eitt inntriv eftir 12. viku í viðgongutíðini hevur við sær.

Jú longri í viðgongutíðini kvinnan er komin, jú størri er vandi fyri komplikatiónum í sambandi við fosturtøku. Heilsuvandin kann skifta alt eftir fleiri faktorum, undir hesum heilsustøðan hjá kvinnuni, hvussu fosturtøkan verður framd og møguligum komplikatiónum undir inntrivinum.

Talan er um eina ítøkiliga og læknafakliga meting.

**Til § 5.** *Um fostrið er lívført*
Loyvi kann sum meginregla ikki gevast til fosturtøku, um fostrið er lívført. Sostatt verður eitt evsta mark sett fyri, nær fosturtøka kann verða framd.

Er fostrið lívført, kann loyvi til fosturtøku bara verða givið, um fostrið er so álvarsliga sjúkt, undir hesum hevur so álvarslig avskap, at avgerandi grundir tala fyri ikki at noyða kvinnuna at ganga viðgongutíðina út. Í metingini av lívførinum hjá einstaka fostrinum er tað avgerandi, um verulig útlit eru fyri, at barnið kann yvirliva í øllum førum í nakrar vikur, um tað varð føtt, tá ið inntrivið annars var ætlað. Um so er, verður mett, at fostrið er lívført.

Løgfrøðiliga verður eitt fostur mett sum eitt barn, um í minsta lagi 22 heilar vikur av viðgongutíðini eru farnar, tað vil siga tá ið kvinnan er komin 22 + 0 í viðgongutíðini. Um barnið tá verður føtt og ikki vísir lívstekin, er talan um eitt deyðføtt barn og ikki eitt fostur.

Hetta merkir, at tað sambært § 189, stk. 1, í anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021 (sundheitslógini) skal fremjast líksýn, og deyðsváttan skal útflýggjast.

**Til § 6.** *Einans lækni kann fremja fosturtøku.*
Fosturtøka kann bara verða framd av lækna í sjúkrahúsverkinum. Eru lógarásettu treytirnar fyri at fáa fosturtøku loknar, skal kvinnan fáa fosturtøku framda.

Sjúkrahúsverkið hevur serlæknar og heilsustarvsfólk, sum hava neyðugu førleikarnar á økinum, eins og neyðugu hentleikarnir eru tøkir í sjúkrahúsverkinum.

**Til § 7.** *Stuðulssamrøða fyri og eftir inntrivið.*
Kvinnan skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um hetta.

Ein sjálvstøðug og óheft fosturtøkuráðgeving verður skipað, har kvinnan hevur møguleika fyri at fáa eitt óheft og navnloynt prát við ein heilsufrøðing, sum er fosturtøkuráðgevi. Eisini ber til at fáa ráðgeving frá sálarfrøðingi, løgfrøðingi, sosialráðgeva ella øðrum viðkomandi fakkunnleika.

Prátið kann fara fram telefoniskt, men um kvinnan hevur tørv á einari persónligari samrøðu, kann hetta verða skipað eftir nærri avtalu.

Tað vera heilsufrøðingar hjá Gigni, sum svara telefonini. Heilsufrøðingar eru settir undir Gigni, sum er stovnur undir Heilsutrygd.

Læknin hevur sambært § 10 skyldu til at kunna kvinnuna um møguleikarnar fyri at fáa ráðgeving og stuðulssamrøðu áðrenn og eftir inntrivið.

Tað er tó ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinna hevur havt eina stuðulssamrøðu.

Endamálið við samrøðuni áðrenn inntrivið er at geva kvinnuni kunning og stuðul til sjálv at kunna taka eina væl grundaða avgerð um, hvørt fosturtøka skal fremjast ella ikki. Undir samrøðuni skal ráðgevandi parturin ikki ávirka avgerðina hjá kvinnuni, men skal royna at geva henni eitt so væl upplýst grundarlag um gjørligt til sjálv at taka avgerðina.

Kvinnan hevur somuleiðis í boði at fáa ráðgeving og kunning um møguleikar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina og fyri stuðli eftir, at barnið er føtt.

Kvinnan hevur eisini í boði at fáa kunning um møguleikan at burturættleiða barnið.

Endamálið við samrøðuni eftir inntrivið er at geva kvinnuni stuðul til at koma ígjøgnum møguligan sálarligan og annan ampa av at hava fingið framt fosturtøku. Fyribyrging kann eisini verða ein partur av samrøðuni.

Samrøðan skal ikki vera beint eftir, at inntrivið er framt, av tí at kvinnan tá kann vera ávirkað av narkosu.

Tekur kvinnan ikki av einum tilboði um ráðgeving, og framvegis vil hava fosturtøku, skal fosturtøkan fremjast, um kvinnan lýkur treytirnar fyri at fáa fosturtøku. Tað er sostatt ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan skal hava fingið ráðgeving áðrenn inntrivið.

*Til stk. 2.*
Landsstýrisfólkinum er heimilað at áseta nærri reglur í hesum sambandi. Her verður serliga hugsað um at skipa innihaldið í vegleiðingini, soleiðis at tryggjað verður, at allar kvinnur fáa nøktandi og somu vegleiðing.

**Til § 8.**
*Til stk. 1. Umsókn. Kvinna søkir sjálv.*
Ásett verður, at tað er kvinnan sjálv, sum skal biðja um at fáa fosturtøku. Við hesum verður betri møguleiki fyri at staðfesta, um tað veruliga er kvinnan sjálv, sum vil hava fosturtøku, og at hon ikki verður tvingað til tað av øðrum.

Um ein kvinna vil hava fosturtøku, skal hon venda sær til ein kommunulækna. Kvinnan kann eisini venda sær til ein annan lækna enn sín egna lækna.

Við tað at tað er kvinnan sjálv, sum avger, um hon vil hava fosturtøku, er tað ikki eitt krav, at hjúnafelagi ella samlivi skal úttala seg ella geva samtykki í samband við eina fosturtøku.

Tann, sum søkir um fosturtøku, skal útfylla og undirskriva eitt oyðublað. Tað vil siga kvinnan sjálv, sambært § 8, stk. 1, ella verjin, sambært § 8, stk. 2. Tað sama er galdandi, tá ið tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, geva samtykki sambært § 9, stk. 1.

Bæði læknin og kvinnan skulu skrivliga vátta, at kvinnan hevur fingið í boði ráðgeving sambært § 7 og kunning og vegleiðing um inntrivið sambært § 10. Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar til §§ 7 og 10.

Er kvinnan undir 18 ár og vil hava fosturtøku, men foreldramyndugleikin noktar at geva samtykki til tað, kann læknin hjálpa kvinnuni at senda samráðnum umsókn um loyvi. Læknin kann eisini hjálpa kvinnu undir 18 ár at senda umsókn til samráðið, um kvinnan av einihvørji orsøk vil sleppa undan at biðja foreldramyndugleikan um samtykki. Sí § 10, stk. 3.

Tað ber ikki til at senda umsókn beinleiðis til samráðið, tí umsókn altíð skal sendast gjøgnum ein lækna.

*Til stk. 2. Umsókn frá serligum verja sambært § 50 í verjumálslógini*
Er kvinnan ikki før fyri at skilja týdningin av inntrivinum, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku eftir umbøn frá einum serligum verja. Í slíkum førum krevst loyvi frá samráðnum, hóast freistin upp á 12 vikur ikki er farin.

Verjin verður tilnevndur eftir reglunum í § 50 í verjumálslógini. Tað er Familjufyrisitingin, sum tilnevndir verjan. Víst verður til Anordning nr. 397 af 20. april 2010 om ikrafttræden for Færøerne af værgemålsloven, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021.

Hevur kvinnan longu ein verja, kann viðkomandi tilnevnast til eisini at taka støðu til spurningin um fosturtøku, um tað verður mett skynsamt. Tað er tó ætlanin, at tað helst skal

vera ein persónur, sum kvinnan er í familju ella svágd við, ella eitt vinfólk, sum kvinnan er tætt knýtt at og sum kennir hana væl.

Um tað stendur um lív og heilsu hjá kvinnuni, er ikki neyðugt við umbøn frá verjanum. Tá er støðan fevnd av § 2, og yvirlæknin á sjúkrahúsinum kann taka avgerð um fosturtøku uttan loyvi frá samráðnum. Inntrivið verður tá mett sum eitt og hvørt annað neyðugt skurðtiltak. Tað er ikki rímiligt, at inntrivið í slíkum førum skal vera treytað av og í møguligum hættisligum støðum seinkað av, at eitt loyvi skal vera fingið.

**Til § 9.**
*Til stk. 1. Kvinna undir 18 ár. Samtykki frá foreldramyndugleikanum.*
Børn og ung undir 18 ár eru ómyndug og undir foreldramyndugleika. Hetta er tó ikki galdandi, um tey eru gift.

Er kvinnan undir 18 ár, og er hon ikki gift, skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, geva samtykki til umbøn hennara um fosturtøku.

Tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, kunnu ikki sjálvi søkja um fosturtøku vegna ungu kvinnuna. Ein fosturtøka kann, líkamikið, hvussu gomul kvinnan er, ikki verða framd, um kvinnan ikki sjálv vil hava fosturtøku.

Er kvinnan undir 18 ár og vil hava fosturtøku, og foreldramyndugleikin noktar at geva samtykki til tað, kann læknin hjálpa kvinnuni at senda samráðnum umsókn um loyvi. Læknin kann eisini hjálpa kvinnu undir 18 ár at senda umsókn til samráðið, um kvinnan av einihvørji orsøk vil sleppa undan at biðja foreldramyndugleikan um samtykki. Sí § 10, stk. 3.

Tað ber ikki til hjá kvinnuni at senda umsókn beinleiðis til samráðið, tí umsókn altíð skal sendast gjøgnum ein lækna. Sí § 8, stk. 1, 2. pkt.

Um tað stendur um lív og heilsu hjá kvinnuni, er ikki neyðugt við samtykki. Tá er støðan fevnd av § 2, og yvirlæknin á sjúkrahúsinum kann tá taka avgerð um fosturtøku uttan samtykki og loyvi frá samráðnum. Inntrivið verður tá mett sum eitthvørt annað neyðugt skurðtiltak. Tað er ikki rímiligt, at inntrivið í slíkum førum skal vera treytað av og í møguligum hættisligum støðum vera seinkað av, at eitt samtykki skal innheintast og at eitt loyvi skal fyriliggja.

Hendan ásetingin er galdandi fram um ásetingarnar í anordning nr. 821 af 22. juni 2018 om ikrafttræden for Færøerne af sundhedsloven, sum broytt við anordning nr. 1443 frá 29. juni 2021 (sundheitslógini) um, at 15 til og við 17 ára gomul sum meginregla sjálvi kunnu geva samtykki til viðgerð, men at foreldramyndugleikin sum meginregla skal kunnast og inndragast í støðutakanina hjá tí unga.

Tá ið samráðið tekur avgerð, skal dentur m.a. leggjast á barnsins besta, og samráðið skal tryggja barninum ta verju og umsorgan, sum er neyðug fyri trivnaðin hjá barninum. Hesi atlit viga tungt í metingini av, um fosturtøka kann verða loyvd ella ikki.

*Til stk. 2. Samráðið kann avgera, at samtykki ikki skal innheintast.*
Samráðið kann geva loyvi til, at samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan sambært stk. 1 ikki skal innheintast. Hetta er tó bara galdandi, tá ið umstøðurnar tala fyri tí.

Fyri at kunna taka støðu til hetta, er neyðugt at meta um viðurskiftini millum gentuna ella ungu kvinnuna og foreldrini. Í hesum sambandi kann samráðið t.d. biðja um upplýsingar frá heilsufrøðingi ella øðrum viðkomandi.

Hetta merkir, at samtykki skal vera fingið uttan so, at avgerandi grundir tala ímóti tí. Tað er t.d. ikki neyðugt við samtykki, um orsøk er til at halda, at tað fer at fáa álvarsligar fylgjur fyri kvinnuna, um tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, fáa kunnleika um, at hon er við barn. Tað kann t.d. vera vandi fyri, at tann ella tey, sum hava foreldramyndguleikan reagera so ógvisliga, at vandi er fyri, at kvinnan verður fyri likamligum ella sálarligum harðskapi, ella at kvinnan verður sosialt rikin burtur á ein slíkan hátt, at tað fær ógvusligar fylgjur fyri hana.

Tað er t.d. heldur ikki neyðugt við samtykki, um talan er um umstøður, har gentan ella unga kvinnan er vorðin við barn við blóðskemd.

Samráðið eigur í slíkum førum at umhugsa, um fráboðan skal sendast barnaverndartænastuni.

Tað er sostatt ikki nokk, at gentan ella unga kvinnan t.d. er bangin fyri, at foreldrini verða ill ella vónbrotin, um tey fáa kunnleika um, at hon er kynsliga virkin.

Tað er heldur ikki neyðugt við samtykki, um verjin ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, t.d. orsakað av sjúku ella líknandi, ikki kunnu taka avgerð um viðurskiftini hjá barninum ella tí unga.

Tað sama er galdandi, um unga kvinnan t.d. í longri tíð ikki hevur havt nakað samband við tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan.

Aldur og búnaskapur hjá kvinnuni kann hava týdning í metingini av, hvørt samtykki skal fáast til vegar ella ikki. Yngri kvinnan er, trengri er møguleikin fyri undantaki.

Samráðið ger eina ítøkiliga meting í hvørjum einstøkum føri. Talan er ikki um eina úttømandi uppreksan av støðum sum kunnu grunda, at samtykki ikki skal innheintast.

Tá ið samráðið tekur avgerð, skal dentur m.a. leggjast á barnsins besta, og samráðið skal tryggja barninum ta verju og umsorgan, sum er neyðug fyri trivnaðin hjá barninum. Hesi atlit viga tungt í metingini av, um fosturtøka kann verða loyvd ella ikki.

*Til stk. 3. Samráðið kann geva loyvi, hóast samtykki er noktað.*
Tá ið talan er um eina unga kvinnu undir 18 ár, er talan um eitt barn. Men tað er ikki altíð, at tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan vita, hvat er best fyri barnið.

Í serligum førum kann samráðið tí geva loyvi til fosturtøku, hóast tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, nokta at geva samtykki til fosturtøku.

Er kvinnan undir 18 ár og vil hava fosturtøku, og foreldramyndugleikin noktar at geva samtykki til tað, kann læknin hjálpa kvinnuni at senda samráðnum umsókn um loyvi. Læknin kann eisini hjálpa kvinnu undir 18 ár at senda umsókn til samráðið, um kvinnan av einihvørji orsøk vil sleppa undan at biðja foreldramyndugleikan um samtykki. Tað ber ikki til hjá kvinnuni at senda umsókn beinleiðis til samráðið, tí umsókn altíð skal sendast gjøgnum ein lækna, sí § 10, stk. 3.

Áðrenn samráðið viðger eina umbøn um fosturtøku frá kvinnu undir 18 ár, verður gentan ella unga kvinnan vanliga biðin at koma til eina samrøðu við ein sosialráðgeva ella ein psykiatara/sálarfrøðing.

Samráðið er óheft og kann lýsa og taka støðu út frá barnsins sjónarmiði. Tá ið samráðið tekur avgerð, skal dentur m.a. leggjast á barnsins besta, og samráðið skal tryggja barninum ta verju og umsorgan, sum er neyðug fyri trivnaðin hjá barninum. Hesi atlit viga tungt í metingini av, um fosturtøka kann verða loyvd ella ikki.

Aldur og búnaskapur hjá gentuni ella ungu kvinnuni kunnu hava týdning í hesum sambandi.

**Til § 10.**
*Til stk. 1. Læknin skal kunna um stuðulssamrøðu og møguleikar fyri stuðli áðrenn og eftir, at barnið er føtt.*
Uttan mun til nær í viðgongutíðini kvinnan setir fram umbøn um fosturtøku, skal læknin, sum fær eina umsókn um fosturtøku, upplýsa kvinnuna um møguleikan fyri ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 7, har hon kann fáa upplýsing um møguleikarnar fyri at søkja um sosialan, fíggjarligan og persónligan stuðul bæði til at fullføra viðgongutíðina og um stuðul eftir, at barnið er føtt.

Um kvinnan ikki vil taka av tilboðnum um ráðgeving, men framvegis vil hava fosturtøku, skal fosturtøkan fremjast, um kvinnan aðramáta lýkur treytirnar fyri at fáa fosturtøku. Tað er sostatt ikki eitt krav fyri at fáa fosturtøku, at kvinnan hevur fingið ráðgeving áðrenn inntrivið.

*Til stk. 2. Læknin skal kunna um inntrivið, fylgjur og vandan við inntrivinum.*
Læknin skal vegleiða og kunna kvinnuna um inntrivið og fylgjur og vandan, sum mugu metast at vera sambundin við inntrivið.

Kravið um vegleiðing og kunning er galdandi bæði fyri fosturtøku, sum verður framd við heilivági, og sum skurðviðgerð.

Bæði kvinnan og læknin skulu skriva undir uppá, at kvinnan hevur fingið vegleiðing og kunning sum ásett í stk. 1 og 2.

Verður fosturtøka umbiðin av verjanum, ella hevur tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, givið samtykki til fosturtøku, skulu tey eisini vátta, at tey hava fingið somu vegleiðing og kunning.

*Til stk. 3. Læknin kann hjálpa kvinnu undir 18 ár at senda umsókn um loyvi sambært § 9, stk. 2 og 3.*
Er kvinnan undir 18 ár og vil hava fosturtøku, og foreldramyndugleikin noktar at geva samtykki til tað, kann læknin hjálpa kvinnuni at senda samráðnum umsókn um loyvi. Læknin kann eisini hjálpa kvinnu undir 18 ár at senda umsókn til samráðið, um kvinnan av einihvørji orsøk vil sleppa undan at biðja foreldramyndugleikan um samtykki.

Tað ber ikki til hjá kvinnuni at senda umsókn beinleiðis til samráðið, tí umsókn altíð skal sendast gjøgnum ein lækna, sí § 8, stk. 1, 2. pkt..

**Til § 11.** *Læknin sendir umsókn víðari til samráðið.*
Metir læknin, at treytirnar fyri at fáa fosturtøku eftir §§ 1 og 2 ikki eru loknar, skal læknin beinanvegin leggja umsóknina saman við egnari meting fyri samráðið. Læknin skal somuleiðis senda skjalprógv fyri teimum kanningum, sum eru gjørdar í viðgongutíðini.

Ásetingin fevnir bæði um kommunulækna, sum fær eina umsókn um fosturtøku, og um læknan, sum skal fremja fosturtøkuna.

**Til § 12.** *Meirkunning tá ið barnið er álvarsliga sjúkt í móðurlívi*
Er umsóknin um fosturtøku grundað á umstøður, sum nevndar eru í § 3, nr. 3, skal kvinnan hava í boði upplýsingar um møguleikan fyri meira kunning og ráðgeving hjá viðkomandi myndugleikum, felagsskapum og fakfólki.

Her verður eitt nú hugsað um serlæknar, sum hava ávísa vitan innan serstøk økir og sum tí eisini kunnu veita serliga kunning og ráðgeving.

Eisini verður hugsað um MEGD og teirra felagsskapir, har nøkur teirra kenna til ein gerandisdag við álvarsligum sálarligum ella likamligum sjúkum, og hvørjir møguleikar eru at fáa hjálp at bøta um støðuna.

Almannaverkið kann eisini vegleiða kvinnum um stuðulsmøguleikar til foreldur at børnum við serligum tørvi.

Endamálið við ásetingini er at tryggja, at kvinnan fær rætta og viðkomandi fakliga ráðgeving, soleiðis at hon kann taka eina avgerð út frá einum væl upplýstum grundarlagi.

**Til § 13.**
Landsstýrisfólkið fær heimild at áseta nærri reglur um umsókn um fosturtøku og um viðgerð av málum um fosturtøku. Tað kann vera um mannagongdina, tá ið søkt verður um fosturtøku, t.d. við oyðubløðum, og um innihaldið í vegleiðingini og kunningini, sum kvinnan hevur krav uppá. Eisini kann verða ásett, at umsókn kann latast inn talgilt.

**Til § 14.**
*Til stk. 1. Samráðið.*
Landsstýrisfólkið setir eitt samráð, sum tekur avgerð um, hvørt loyvi kann verða givið til fosturtøku, eftir at freistin upp á 12 vikur er farin, sambært § 3-5, um loyvi kann vera givið til fosturtøku eftir umbøn frá einum verja, sambært § 8, stk. 2, og um ein kvinna undir 18 ár kann fáa fosturtøku uttan loyvi frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, sambært § 9, stk. 2 og 3.

Tá ið samráðið verður sett, eigur landsstýrisfólkið at tryggja, at samráðið er politisk og í aðrar mátar óheft, og at tey, sum verða tilnevnd í samráðið, hava innlit í faklig viðurskifti, ið hava týdning fyri virkið hjá samráðnum. Hetta kann verða gjørt við, at landsstýrisfólkið setir limirnar í samráðnum eftir tilmæli frá viðkomandi myndugleikum og avvarðandi fakfeløgum.

Ítøkiliga merkir hetta, at løgfrøðingurin kann verða settur eftir tilmæli frá Løgmálaráðnum, sosialráðgevin kann verða settur eftir tilmæli frá Sosialráðgevarafelag Føroya, sálarfrøðingurin kann verða settur eftir tilmæli frá Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar, og læknarnir kunnu verða settir eftir tilmæli frá Heilsumálaráðnum.

Ásett verður, at samráðið skal taka avgerð skjótast gjørligt, tað vil siga uttan óneyðugt drál.

Í teimum førum, har loyvi til fosturtøku krevst frá samráðnum, skal kvinnan útfylla eitt oyðublað hjá læknanum. Læknin sendir oyðublaðið til samráðið saman við journalini og skjalprógvi fyri kanningum, sum eru gjørdar í viðgongutíðini. Um tørvur er á tí, fær samráðið til vegar tær upplýsingar, sum eru neyðugar fyri at kunna taka avgerð í málinum. Víst verður í hesum sambandi til § 27, stk. 2, nr. 4 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

Er umsókn um fosturtøku grundað á staðfesta sjúku ella avskap hjá fostrinum, verður málið sum meginregla viðgjørt á skrivligum grundarlagi. Í flestu førum kann samráðið taka avgerð beinanvegin við støði í teimum upplýsingum, sum samráðið hevur fingið frá lækna ella sjúkrahúsinum. Eru ivamál, kann samráðið biðja um fleiri upplýsingar, t.d. metingar frá lækna ella at fleiri kanningar verða gjørdar.

Er umsókn um fosturtøku grundað á sosial og persónlig viðurskifti, fær samráðið til vegar fleiri upplýsingar, og hetta verður vanliga gjørt við at hava eina samrøðu við kvinnuna. Samráðið kann avgera, at ein kanning skal gerast hjá serlækna í psykiatri, sum skal lýsa serligu umstøðurnar nærri. Endamálið er at lýsa viðurskiftini hjá kvinnuni so væl sum gjørligt. Málsviðgerðartíðin í samráðnum kann tá taka longri tíð.

Kvinnan hevur sum meginregla rætt til at hava ein hjásita við sær og um neyðugt eisini ein tulk, teknmálstulk ella onnur, sum tørvur er á.

*Til stk. 2.*
Í samráðnum eru ein løgfrøðingur, ein sosialráðgevi, ein sálarfrøðingur umframt tveir læknar. Annar læknin skal vera serlækni í kvinnusjúkum, og hin skal vera serlækni í psykiatri. Hetta fyri at tryggja eina víðfevnda og gjølliga meting av fleiri ymiskum atlitum, sum eitt mál um fosturtøku má metast at viðføra. Við at brúka løgfrøðiligan, læknafrøðiligan, sosialfakligan og sálarligan fakkunnleika er góður møguleiki fyri at meta um samlaðu støðuna hjá kvinnuni og at taka eina vælgrundaða avgerð, sum leggur upp fyri bæði rættindunum og likamligu og sálarligu heilsuni hjá kvinnuni.

Løgfrøðingurin er við fyri at tryggja, at lóggávan á økinum verður hildin, og at øll rættindi og skyldur sambært løgtingslógini verða vird. Eisini skal løgfrøðingurin tryggja, at málsviðgerðin fer rætt fram, og at ásetingarnar í dátuverndarlógini verða hildnar. Løgfrøðingurin skal hava løgfrøðiligt kandidatsprógv ella aðra samsvarandi útbúgving.

Sosialráðgevin kann meta um sosialu støðuna hjá kvinnuni, undir hesum um fíggjarlig og persónlig viðurskifti, umframt bústaðarviðurskifti.

Sálarfrøðingurin kann trygga, at atlit verður tikið til sálarligu heilsuna hjá kvinnuni og tryggja, at hædd verður tikin fyri kenslunum hjá kvinnuni.

Serlæknin í kvinnusjúkum hevur fakkunnleika innan reproduktiva heilsu og barnsburð og kann meta um likamligu heilsuna hjá kvinnuni og fostrinum, undir hesum um vandi er fyri komplikatiónum, og um lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda.

Ein psykiatari kann meta um sálarligu heilsuna hjá kvinnuni, undir hesum hennara førleikar til at handfara viðgongutíðina og eina møguliga fosturtøku og møguligar sálarfrøðiligar avleiðingar í hesum sambandi.

*Til stk. 3.*
Ásett verður, at limirnir í samráðnum og teirra varalimir verða vald fyri 4 ár í senn. Somu limir kunnu veljast aftur.

*Til stk. 4.*
Landsstýrisfólkinum verður heimilað at áseta nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið.

Starvsskipanin ásetir heimildarøkið og skal hava reglur um t.d. innkalling til fund, um viðtøkuføri, hvussu fundirnir verða skipaðir, nær viðgerðin kann vera á skrivligum grundarlagi, um ógegni, tagnarskyldu o.a., umframt reglur um at senda víðari avgerðir til Føroya Kærustovn sum kærumyndugleika.

**Til § 15.** *Meiriluti krevst at geva loyvi*
At taka avgerð um, hvørt ein fosturtøka kann verða framd ella ikki, er ein sera inntrívandi avgerð, sum beinleiðis ávirkar rættindi hjá fólki.

Avgerðir hjá samráðnum verða tí tiknar við vanligum meiriluta.

**Til § 16.** *Kæra*
*Til stk. 1. Samráðið sendir noktandi avgerð beinleiðis til Føroya Kærustovn.*
Avger samráðið, at loyvi ikki kann verða givið til fosturtøku, skal samráðið beinanvegin senda avgerðina til Føroya Kærustovn saman við grundgeving fyri avgerðini. Øll viðkomandi skjøl, sum samráðið hevur, skulu eisini sendast Kærustovninum.

Hetta er treytað av, at kvinnan, verjin ella tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, vilja hava Føroya Kærustovn at endurskoða avgerðina og taka endaliga støðu í málinum.

Sambært § 9, stk. 2, kann samráðið geva loyvi til, at kvinna, sum er undir 18 ár, kann fáa fosturtøku uttan samtykki frá tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan. Í slíkum førum skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, ikki kunnast um og taka undir við, at málið verður lagt fyri Føroya Kærustovn til støðutakan.

*Til stk. 2. Serkøn hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum.*
Tað er ásett í løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, at í málum, har serkunnleiki verður mettur neyðugur fyri viðgerðina, verður Føroya Kærustovnur settur við stjóranum og einum ella tveimum løgfrøðingum umframt einum ella tveimum viðkomandi serkønum.

Í uppskotinum verður ásett, at í fosturtøkumálum eru serkøn altíð við at taka avgerð. Tey serkønu hjá Føroya Kærustovni í fosturtøkumálum eru serlækni í kvinnusjúkum ella ein barnalækni (serlækni í pædiatri), og serlækni í psykiatri ella persónur, sum hevur serligt innlit í sosialmedisin.

Hesi serkønu skulu taka avgerð í kærumálum um fosturtøku saman við løgfrøðingunum á Føroya Kærustovni.

Í Føroyum eru í løtuni 4 serlæknar í kvinnusjúkum í starvi. Ein serlækni í kvinnusjúkum skal vera í samráðnum, og tí kann tað gerast trupult at finna ein óheftan serlækna í kvinnusjúkum afturat, sum skal vera serkønur hjá Føroya Kærustovni. Upplýst er, at serlækni í pædiatri, t.e. ein barnalækni, hevur eins og ein serlækni í kvinnusjúkum góðar førleikar til at meta um, hvørt treytirnar fyri fosturtøku eru loknar ella ikki. Við at hava møguleikan fyri at hava ein barnalækna sum serkønan, verður hædd í ávísan mun tikin fyri støðum, har serlæknin í kvinnusjúkum er ógegnigur.

Víst verður í hesum sambandi til viðmerkingarnar í § 14, stk. 2, har tað er nærri grundgivið fyri fakbólkum.

*Til stk. 3.*
Føroya Kærustovnur skal taka avgerð skjótast gjørligt og í seinasta lagi innan 7 dagar.

Tað er umráðandi, at mál um fosturtøku verða avgreidd so skjótt sum gjørligt, tí talan er um mál, har hvør dagur telur, tí ein møgulig fosturtøka eigur at verða framd skjótast til ber. Við atliti at rættartrygdini hjá borgarunum er tað altavgerandi, at kærumálini verða viðgjørd so skjótt sum gjørligt.

Kærustovnurin skal senda avgerðina bæði til samráðið og til umsøkjaran.

Víst verður til løgtingslóg nr. 147 frá 25. november 2021 um Føroya Kærustovn, har viðgerðin av kærumálum er nærri ásett.

**Til § 17.** *Ársfrágreiðing.*
Samráðið skal á hvørjum ári gera eina ársfrágreiðing, sum verður latin landsstýrisfólkinum.

Frágreiðingin skal lýsa virksemið hjá samráðnum fyri farna árið, undir hesum talið á umsóknum, tal av loyvum, hvørjar umstøður talan er um, og við hvørjari heimild avgerðir eru tiknar, viðgerðartíðin, nær í viðgongutíðini fosturtøkan varð framd, aldurin á kvinnuni o.a., sum kann metast at vera viðkomandi fyri at fáa yvirlit yvir støðuna.

Ein slík frágreiðing kann vera við til at tryggja gjøgnumskygni á økinum, og hvussu undantaksásetingarnar í § 3 verða tulkaðar í praksis, soleiðis at tryggjað verður, at allar kvinnur eru eins fyri lógini.

**Til § 18.** *Revsiásetingar*
*Til stk. 1.*
Ásett verður, at lækni, sum fremur fosturtøku, uttan at treytirnar í §§ 1 og 2 eru loknar, og uttan at tað er givið loyvi eftir §§ 3-5, verður revsaður við sekt ella fongsli í upp í 2 ár.

Hevur læknin t.d. framt fosturtøku uttan loyvi frá samráðnum, men har treytirnar fyri at fáa fosturtøku annars eru loknar, er talan um linnandi umstøður. Tá kann læknin verða revsaður við sekt.

Sambært ásetingini kann læknin verða revsaður við fongsli í upp í 2 ár, men hetta útihýsir ikki, at læknin kann verða dømdur harðari revsing, um heimild er fyri tí í revsilógini, t.d. í § 241 um óviljað manndráp ella § 249 um óviljaðan skaða á annans likam ella heilsu.

Er talan um støður, har fosturtøka verður framd uttan samtykki frá kvinnuni, er hetta fevnt av ásetingunum í kapittul 25 í revsilógini um brotsverk móti lívi og likami.

*Til stk. 2.*
Ásett verður, at lækni, sum fremur fosturtøku, uttan at treytirnar í §§ 8 og 9 og § 10, stk. 2, eru loknar, verður revsaður við sekt.

Talan er um støður, har ymisk formlig viðurskifti ikki eru í lagi. Læknin hevur sostatt ábyrgdina av, at treytirnar um, at kvinnan skal hava bústað í Føroyum, at samtykki skal fáast til vegar frá verjanum ella tí ella teimum, sum hava foreldramyndugleikan, og at vegleiðingar og upplýsingarskyldan um ráðgeving og vandan við inntrivinum eru loknar, áðrenn ein fosturtøka verður framd uttan loyvi.

Hinvegin hevur læknin ikki skyldu til at kanna, um hesar treytirnar eru loknar, um fosturtøka verður framd við loyvi frá samráðnum. Ásetingin er heldur ikki galdandi um lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda sambært § 2.

*Til stk. 3.*
Ásett verður, at tann, sum ikki er lækni, og sum fremur fosturtøku, verður revsaður við fongsli í upp í 4 ár.

Ásetingin útihýsir ikki, at krotulæknin kann verða dømdur harðari revsing, um heimild er fyri tí í revsilógini, t.d. í § 241 um óviljað manndráp ella § 249 um óviljaðan skaða á annans likam ella heilsu.

Er talan um støður, har fosturtøka verður framd uttan samtykki frá kvinnuni, er hetta fevnt av ásetingunum í kapittul 25 í revsilógini um brotsverk móti lívi og likami.

*Til stk. 4.*
Ásett verður, at revsiásetingarnar í § 18, stk. 1 og 3, verða brúktar á sama hátt fyri tann, sum hjálpir til við at fremja fosturtøku, uttan at treytirnar fyri fosturtøku eru loknar.

Ásetingin fevnir bara um tey, sum beinleiðis hjálpa til við at fosturtøkuni og fevnir sostatt ikki um tey, sum hjálpa til við at fáa eina avtalu um fosturtøku í lag, gjalda útreiðslurnar í hesum sambandi og aðramáta fyrireika praktisk viðurskifti í hesum sambandi.

**Til § 19.**
Ásett verður, at lógarbrot, sum eru framd av ósketni, verða ikki revsaði.
Tað er sostatt eitt krav, at lógarbrotið hevur verið tilætlað.

**Til § 20.**
Gildiskomuáseting og úrgildisseting.
Ásett er, at løgtingslógin kemur í gildi 1. juli 2024, so at tíð er at fyrireika seg til broytingarnar sambært uppskotinum. T.d. skal landsstýrisfólkið seta eitt samráð, og Føroya Kærustovnur skal velja tey serkønu, sum skulu vera við í kæruviðgerðini.

Eisini skal landsstýrisfólið áseta nærri reglur um ráðgevingina sambært § 7, áseta nærri reglur um umsókn um fosturtøku og um viðgerð av málum um fosturtøku sambært § 13 og áseta nærri reglur um starvsskipan fyri samráðið sambært § 14.

Samstundis fer galdandi fosturtøkulóg úr gildi. Tað er lov nr. 177 af 23. juni 1956 om foranstaltninger i anledning af svangerskab m.v.

Løgmálaráðið, 7. mars 2024

**Bjarni Kárason Petersen**
landsstýrismaður

/ Nella Festirstein

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Ummælisskjal
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Suðuroyar Sjúkrahúsi
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Felagnum Føroyskir Sálarfrøðingar
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Føroya Kærustovni
Fylgiskjal 5: Ummæli frá Føroya Pro Vita við fylgiskjali
Fylgiskjal 6: Ummæli frá Mammuhjálpini
Fylgiskjal 7: Ummæli frá MEGD
Fylgiskjal 8: Ummæli frá Fríum vali
Fylgiskjal 9: Ummæli frá Almanna- og mentamálaránum
Fylgiskjal 10: Ummæli frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 11: Ummæli frá Heilsutrygd og Gigni
Fylgiskjal 12: Ummæli frá Amnesty Føroyar
Fylgiskjal 13: Ummæli frá Sosialráðgevarafelag Føroya
Fylgiskjal 14: Ummæli frá Etiska ráðnum
Fylgiskjal 15: Ummæli frá Kvinnufelagnum í Havn
Fylgiskjal 16: Ummæli frá Javna,
Fylgiskjal 17: Ummæli frá Javnstøðunevdini
Fylgiskjal 18: Ummæli frá Familjufyrisitingini
Fylgiskjal 19: Ummæli frá Landssjúkrahúsinum